# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. november 2024 |
| Mál nr.: | 24/23467 |
| Málsviðgjørt: | SR, DK, FE, DB |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum**

**§ 1.** P/F Suðuroyartunnilin er ábyrgdarhavandi byggiharri fyri Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

**§ 2.** Partabrøv felagsins eru ogn landsins.
*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt felagnum at luttaka í fusión, klovningi ella aðrari yvirtøku av virki, sum hevur við sær, at onnur enn landið gerast eigarar av partabrøvum í felagnum.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið skal góðkenna starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrisfólkið skal góðkenna samsýningina til nevnd og stjórn felagsins.

**§ 3.** P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar, letur í útboð og kann taka av tilboðum til hesar verkætlanir:
1) Klárgerðing av tunnilsmunnunum báðumegin Suðuroyartunnilin, og
2) neyðugar arbeiðsvegir í sambandi við ætlaðu tunnilsarbeiðini.

**§ 4.** P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:
1) Farleið frá Líðarenda til Sandoyartunnilin í Traðardali,
2) vegagerð frá Líðarenda til tunnilsmunna í Djúpadali, við íbinding í verandi veg til Skarvanesar, og íbinding til verandi veg til Skálavíkar.
3) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norð í sama bergholi frá Djúpadali, norðanfyri Skarvanes, til Sandvíkar, við klárgerðing til frákoyring til ein tunnil, sum møguliga verður gjørdur seinni til Skúvoyar,
4) vegagerð millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin,
5) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og

6) vegagerð í Hvalba, frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá nýggja Hvalbiartunlinum.

*Stk. 2.* P/F Suðuroyartunnilin kann ikki taka av tilboðum sbrt. stk. 1 fyrr enn heimild er fingin til tess við serstakari løgtingslóg.

*Stk. 3.* Í serstøku løgtingslógini sbrt. stk. 2 verður ásett, hvussu stór játtan verður avsett árliga á løgtingsfíggjarlógini árini framyvir til P/F Suðuroyartunnilin. Eisini verður í somu løgtingslóg givin heimild til landskassan at læna P/F Suðuroyartunlinum pening.

**§ 5.** Landsverk skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrisfólkinum góðkenna verkætlanirnar í §§ 3 og 4, áðrenn arbeiðini verða sett í verk, og tá arbeiðini eru liðug. Landsverk skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendu ætlanunum.

**§ 6.** Tá ið teir tunlar og vegir, sum nevndir eru í § 4, stk. 1, nr. 1-2 og 4-6 eru lidnir, verða teir avhendaðir landinum fyri útveganarkostnað og lagdir afturat vanliga landsvegakervinum.

*Stk. 2.* Frá og við árinum tá Suðuroyartunnilin letur upp fyri ferðslu, hevur felagið við grundarlagi í útveganarkostnaðinum av undirsjóvartunlinum rætt til skattligar avskrivingar samsvarandi reglunum um vinnuligar bygningar.

**§ 7.** Suðuroyartunnilin, sbr. § 4, stk. 1, nr. 4, verður framhaldandi ogn hjá P/F Suðuroyartunlinum og partafelagið stendur fyri rakstri og viðlíkahaldi av tunlinum. Partafelagnum er heimilað at áseta og krevja inn gjald fyri at koyra í gjøgnum tunnilin.

*Stk. 2.* Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at fáa upplýsingar frá Akstovuni um skrásettar eigarar og brúkarar av akførum til tess at ansa eftir gjaldstaðnum.

*Stk. 3.* Skelting og avmerking í Suðuroyartunlinum skal gerast samsvarandi galdandi kunngerð og ferðsluavmerkingum. Øll skelting og vegavmerking skal góðkennast av ferðslumyndugleikanum og landsvegamyndugleikanum.

*Stk. 4.* Suðuroyartunnilin er ikki partur av landsveganetinum sambært løgtingslógum landsvegir við seinni broytingum.

*Stk. 5.* Í mun til loyvi sum krevjast frá ymsum myndugleikum o.a. gongur arbeiðið við Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum eftir somu reglum sum landsvegagerð.

*Stk. 6.* Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at hava Suðuroyartunnilin íbundnan landsveganetið.

*Stk. 7.* Við íbinding í landsvegin, skal felagið gera og rinda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum. Felagið skal rinda fyri íbindingar uttan mun til, um tað er rundkoyring ella onnur íbinding. Um so er, at íbindingin kemur inn í landsveg, verður íbindingin partur av landsvegnum, og ognarrætturin fellur til landsstýrið.

**§ 8.** Landsstýrisfólkið kann ognartaka neyðugt lendi ella tilfar fyri at fremja verkætlanirnar, sbr. §§ 3 og 4, um so er, at semja ikki verður fingin við tey, sum hava rættindi yvir lendinum ella tilfarinum.

*Stk. 2.* Ognartøka verður gjørd móti fullum endurgjaldi.

*Stk. 3.* Ognartøka verður framd sambært lov om forpligtigelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne.

*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið kann avhenda tað ognartikna til P/F Suðuroyartunnilin fyri útveganarkostnað.

**§ 9.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Breið politisk semja er millum flokkarnar í Løgtinginum um, at tíðin nú er búgvin til at taka eitt týðandi stig at fremja Suðuroyartunnilin fyri at venda gongdini í Suðuroynni. Samstundis verður tryggjað, at verkætlanin ikki verður endaliga sett í gongd fyrrenn hon er fyrireikað, prosjekterað, hevur verið í útboði og ein neyvari kostnaðarmeting fyriliggur.

Seinastu hálvu øldina hava skiftandi landsstýri og løgting gjørt munandi íløgur í føroyska samferðslukervið soleiðis, at føroyingar kunna búgva, virka, arbeiða og ferðast í øllum landinum. Við Sandoyartunlinum hava 91% av føroyingum fingið henda møguleika við føstum vegasambandi, og við einum møguligum Suðuroyartunli verða 99% av fólkinum í Føroyum knýtt saman við føstum vegsambandi.

Sitandi Løgting hevur eisini tikið tráðin upp.

Suðuroyggin er tann einasta stóra oyggin, sum eftir er, ið ikki hevur fast samband, og ferðasambandið er til tíðir heldur óstøðugt. Harumframt vísa øll tøl, at Suðuroyggin er í eini serstøðu, tá tað snýr seg um haldføristrupulleikar, sum bara gerast verri, um onki verður gjørt.

Hóast fólkavøksturin hevur verið stórur samanlagt í Føroyum seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Minkingin er grundað á fólkafráflyting og lægri burðartal. Hetta merkir, at tey eldru eru ein lutfalsliga størri partur av fólkinum, meðan tey í arbeiðsførum aldri og børnini eru lutfalsliga færri í tali.

Samstundis eru fleiri avbjóðingar viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum í Suðuroynni, samanborið við restina av landinum. Miðalinntøkan er lægst í Suðuroynni, og ein minni partur av íbúgvunum eru í starvi ella starvssøkjandi. Harumframt er arbeiðsloysið hægri enn í restini av landinum, og serliga er talið av langtíðararbeiðsleysum lutfalsliga hægri í Suðuroynni.

Fyri at venda gongdini, hevur Løgtingið gjørt av, at arbeiða við at knýta Suðuroynna í meginøkið. Í 2022 samtykti Løgtingið at fara undir at fyrireika ein Suðuroyartunnil og játtaðar vórðu samanlagt 20 mió. kr. á fíggjarlógini yvir 2 ár til neyðugar forkanningar, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur staðið fyri.

Forkanningararbeiðið fevnir um at kanna linjuføringar, at gera neyðugar jarðfrøðiligar kanningar, trygdarkanningar, kostnaðarmeting og P/F Suðuroyartunnilin hevur fingið heimild til at fáa alt tilfar, sum er framleitt av Landsverk. Harumframt fekk P/F Suðuroyartunnilin 4 mió. kr. í partapeningi í sambandi við, at felagið bleiv stovnað í 2022.

Í sambandi við fyrireikingararbeiðið av einum møguligum Suðuroyartunli hevur løgmaður lagt dent á at hava allar politiskar flokkar, sum eru umboðaðir í Løgtinginum við í tilgongdini, tí talan er um størstu íløgu í samferðslukervið í føroyskari søgu, bæði viðvíkjandi vavi og fígging, og tí, at ynskiligt er at fáa breiða politiska semju um málið.

**Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík**

Semja er um, at arbeiðast skal víðari út frá forprosjektinum um undirsjóvartunnil, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur gjørt.

Grundarlagið undir arbeiðinum at fyrireika Suðuroyartunnilin hevur verið at finna eina loysn, sum til ber at gjøgnumføra við atliti at jarðfrøði, trygd og kostnað.

P/F Suðuroyartunnilin hevur út frá fyriliggjandi kanningararbeiði víst á, at skilabesta linjuføring út frá fyritreytunum er ein undirsjóvartunnil frá Djúpadali, norðan fyri Skarvanes, til Sandvíkar á Suðuroynni, og fevnir forprosjektið um hesa linjuføring (Fylgiskjal 1).

Høvuðsgrundgevingin fyri linjuføringini er, at undirsjóvartunnilin skal vera so stuttur sum gjørligt fyri at halda prosjektváðarnar við tilhoyrandi avleiðingum so langt niðri sum gjørligt.

Við valdu linjuføring verður undirsjóvartunnilin sambært forprosjektinum 22,8 km langur, 9,5 m breiður og hevur tvær koyribreytir til norður- og suðurkoyrandi ferðslu.

Størsta hall er 5% og mesta dýpið er 180 metrar.

**Jarðfrøði**
Gjørdar eru jarðfrøðisligar forkanningar sambært tilmæli frá Jarðfeingið av økinum, har Suðuroyartunnilin kemur at verða bygdur.

Í høvuðsheitum hevur talan verið um:
- Skrásetingar á landi
- Kjarnuboringar
- Seismiskar kanningar av havbotninum
- Multibeam kanningar av havbotninum

Ætlanin er, at Suðuroyartunnilin verður bygdur í stóran mun í miðfláunum (Malinstindur) og ein partur í ovastu fláunum (Enni). Hetta er jarðfrøði, sum góðar royndir eru við at byggja tunlar í. Vágatunnilin, Norðoyartunnilin og partvís Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í miðfláunum. Sandoyartunnilin og partvís Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í ovastu fláunum.

Higartil hevur ikki verið mett, at jarðfrøðin verður truplari enn hon hevur verið við hinum undirsjóvartunlunum í Føroyum. Hildið verður fram at gera smærri kanningar, sum skulu gerast, áðrenn ein endalig jarðfrøðilig frágreiðing kann gerast liðug. Ætlanin er, at frágreiðingin verður liðug í 2025.

**Trygd**
Tað er sjálvsagt alt avgerandi, at undirsjóvartunnilin verður tryggur bæði í byggitíðarskeiðinum og tá koyrast skal ígjøgnum.

Royndirnar frá Eysturoyar- og Sandoyartunlunum hava víst, at tað er alneyðugt at hava stóra virðing fyri arbeiðinum at gera undirsjóvartunlar og at arbeitt verður í undirgrundini, sum ongin áður hevur verið.

Meðan Eysturoyar- og Sandoyartunlar vórðu í gerð, vóru nøkur óhapp. Talan var m.a. um tveir eldsbrunar, tvey omanlop frammi við benið og eina byrjandi vatnflóð. Óhappini spældu tíbetur væl av, men vísa, at avleiðingarnar kunnu verða ovurhondsstórar um ikki rætt verður borið at.

Tí hevur P/F Suðuroyartunnilin eisini lagt stóra orku í at lýsa váðarnar við einum undirsjóvartunli og at finna loysnir, sum eru tryggar bæði í byggitíðarskeiðinum og tá koyrandi verður ígjøgnum.

Avbjóðingin er millum annað, at ferðslan verður lutfalsliga lítil, og tunnilin verður langur. Hetta hevur í forprosjektinum havt við sær, at ein loysn er vald við einum tunli við ferðslu báðar vegir í sama bergholi.

Neyðugt hevur tí verið at fáa serfrøðingar at gera váðametingar fyri at tryggja, at trygdin verður í lagi, bæði í byggitíðarskeiðinum og í endaliga tunlinum.

Nýggjastu váðametingarnar eru (Fylgiskjøl 4-9):

| | |
|---|---|
| 19.04.2022 | Risiko knyttet til brann ved ulike konsepter for Sudurøytunnelen (Sweco) |
| 06.05.2022 | Brannrisiko under bygging af tunneler (Sweco) |
| 10.11.2023 | Risikovurdering av aspekter knyttet til byggeperioden (Sintef) |
| 24.11.2023 | Risikovurdering, Forprosjekt Suðuroyartunnilin (Norconsult) |
| 15.03.2024 | Risikovurdering av langsgående ventilasjon i Sudurøytunnelen (Sweco) |
| 11.10.2024 | Peer Review and Second Opinion of Risk Analyses for Suðuroyartunnlin, HOJ Consulting GmbH |

Í váðametingunum eru tilmæli um, hvørji tiltøk skulu gerast fyri, at endaliga tunnilsloysnin og arbeiðið at gera tunnilin skulu verða so trygg sum gjørligt.

P/F Suðuroyartunnilin hevur tí biðið um 3. partsmeting av váðametingunum frá HOJ Consulting úr Sveits. 3. partsmetingin frá HOJ Consulting varð tøk um miðjan oktobur 2024 (Fylgiskjal 9).

HOJ Consulting vísir á, at undanfarnar frágreiðingar um trygd hava manglar í mun til góða siðvenju fyri váðastýring.

HOJ Consulting metir, at váðarnir at byggja og reka ætlaða Suðuroyartunnilin kunnu handfarast, men tað krevur neyvari greining av váðunum, neyva fyrireiking og meting av fleiri trygdartiltøkum.

P/F Suðuroyartunnilin arbeiðir longu við hesum trygdartiltøkum, sum eyka tiltøk samanborið við Sandoyartunnilin:

- Vendipláss fyri hvørjar 1.000 metrar (2.000 metrar í Sandoyartunnilin)
- Fjarstýrdir bummar fyri at steingja inni í tunlinum (Er í Sandoyartunlinum)
- Skelting og ávaringarljós (Er í Sandoyartunlinum)
- Møguleiki fyri at venda ventilatiónini (Er í Sandoyartunlinum)
- Krøv til responstíð hjá sløkkiliðnum
- Møguliga krøv til tunga ferðslu
- Møguleiki fyri 22 trygdarrúmum (105 mió. DKK/165 mió. NOK)

Sambært HOJ Consulting eiga fleiri trygdartiltøk at verða kannað nærri fyri at tryggja, at tey eru nøktandi og kostnaðareffektiv, herundir:

- Hátalaraskipan (PA-skipan) í tunlinum
- Trygdarrúm fyri hvørjar 500-1000 metrar (P/F Suðuroyartunnilin hevur arbeitt við 1000 metrum)

- Ferðsluavmarkingar fyri tung akfør/hættisligan farm
- Breiðari tunnilsprofil (umhugsa T10,5 í staðin fyri T9,5)
- Betri bjargingartænastu nær undirsjóvartunlinum

Í sambandi við endaligu prosjekteringina og útbjóðingina av tunnilsverkætlanini verður arbeitt víðari við at greina váðar og møgulig trygdartiltøk, herundir eisini kostnaðin av at seta trygdartiltøkini í verk og ávirkan teirra á trygdina.

**Tilhoyrandi tunnils- og vegakervi**
Forkanningararbeiðið, sum Løgtingið við játtan á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur samtykt, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi gera, er komið væl ávegis.

Givið er tó, at fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at verkætlanin kann bjóðast út. Harumframt eru eisini verkætlanir tiknar við í samlaðu verkætlanini, sum higartil ikki hava verið partur av arbeiðinum.

Verkætlanin fevnir eisini um ein tunnil millum Sandvík og Hvalba, tunnilsvegir í Sandvík og á Skarvanesi, og umfarsveg í Hvalba. Harumframt verður farleiðin millum Líðarenda og Sandoyartunnilin og farleiðin millum Líðarenda og Suðuroyartunnilin partur av samlaðu verkætlanini um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

P/F Suðuroyartunnilin hevur gjørt eitt forprosjekt, sum fevnir um tunnil millum Sandvík og Hvalba, umfarsveg í Hvalba og tunnilsveg í Sandvík.

Farleiðin millum Líðarenda og Sandoyartunnilin og farleiðin millum Líðarenda og Suðuroyartunnilin eru ikki við í forprosjektinum. Ymiskar loysnir eru umrøddar.

Eitt nú stutt vegastrekki og langur tunnil gjøgnum Sandalíð, ella stuttur tunnil og langt vegastrekki gjøgnum Sandalíð. Báðar loysnir krevja, at vegurin um Sands bygd verður dagførdur til øktu ferðlsluna. Harumframt er ein triði møguleiki at gera ein longri veg, sum kemur at liggja omanfyri verandi farleið.

Verður inniverandi lógaruppskot samtykt, verður arbeitt víðari við fyrireiking og prosjektering av einstøku verkætlanunum.

Burtursæð frá sjálvum Suðuroyartunlinum, hevur forprosjektið ikki gjørt endalig tilmæli um linjuføringar fyri vegir og tunlar frá undirsjóvartunlinum til landsvegin sunnanfyri Hvalba.

Myndirnar, sum eru í hesum uppskoti, vísa tí ikki endaligar linjuføringar, sum liggja fast.

Víðari fyrireikingar, myndugleikakrøv o.a. skulu endaliga fastleggja, hvar linjuføringarnar skulu vera, áðrenn einstaku partarnir av verkætlanini verða prosjekteraðir.

Einstøku verkætlanirnar eru nærri útgreinaðar í serligu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Upplýsast skal, at einstøku verkætlanirnar eru á ymiskum stigum, tá tað snýr seg um fyrireiking, og at arbeitt verður víðari við verkætlanunum, um Løgtingið samtykkir inniverandi lógaruppskot.

**Skúgvoy**

Semja er um, at Skúgvoy ikki verður knýtt uppí Suðuroyartunnilin í fyrstu atløgu, men at við einum tunnilsøki verður gjørt klárt til, at Skúvoy møguliga í framtíðini kann knýtast uppí Suðuroyartunnilin. Metti kostnaðurin av at knýta Skúvoy uppí er millum 200 og 400 mió. kr. í 2023 krónum alt eftir hvør linjuføringin verður.

Stytsta linjuføring verður mett at kosta áleið 200 mió. kr. og hevur við sær, at hallið á "uppkoyringini" verður 12,5%, sum er munandi hægri enn í øðrum tunlum og minnir um Mannbrekku í Hoyvík. Harafturat er tað ivasamt, hvørja og hvussu nógva ferðslu Skúgvoy kann bera. Verður Skúgvoy knýtt at verkætlanini við Suðuroyartunlinum, verður byggitíðarskeiðið væntandi longt við nakað.

Sambært váðametingunum er ein íbinding til Skúgvoy ikki ein fortreyt fyri einum Suðuroyartunli.

**Uppgávu- og myndugleikabýtið P/F Suðuroyartunnilin og Landsverk**

Politiska ynski hevur verið, at talan skal verða um eina samlaða verkætlan, sum fevnir bæði um undirsjóvartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi fyri at tryggja, at øll vegastrekki eru við, at verkætlanirnar eru samskipaðar og at verkætlanin kann gerast á mest skynsama hátt búskaparliga.

Politisk semja er um, at almenna partafelagið, P/F Suðuroyartunnilin, skal standa fyri samlaðu verkætlanini.

Landsverk er góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki fyri at tryggja ferðslufakligu dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervið annars. Tryggjast skal millum annað, at teir normar og standardir, sum eru galdandi á økinum, tá henda lóg er samtykt, verða fylgdar.

Verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, og Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendum prosjektum.

Landsverk skal gjøgnum hvørja fasu í prosjekteringunum hava tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til góðkenningar og skal harafturat vegna landsstýrisfólkið góðkenna endaligu prosjektini.

At partafelagið stendur fyri samlaðu verkætlanini skal tryggja, at arbeiðið at gera undirsjóvartunnil verður samskipað við arbeiðið at gera tilhoyrandi vegir og tunlar, og soleiðis minka vandan fyri, at til- og frákoyringarvegir ikki eru lidnir og klárir at taka í nýtslu í seinasta lagi, tá koyrandi verður gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Fleiri av teimum feløgum, sum vóru í arbeiðinum við Eysturoyar- og Sandoyartunlinum eru eisini partur av P/F Suðuroyartunlinum. Felagið hevur tó ikki somu royndir við at standa fyri vega- og tunnilsverkætlanum á landi. Tí er ætlanin, at felagið letur partar av uppgávunum til Landsverk, sum varar av landsvegakervinum, og tí hevur drúgvar royndir og holla vitan at standa fyri tunnils- og vegagerð á landi í Føroyum.

Mett verður, at tað tænir samlaðu verkætlanini, at P/F Suðuroyartunnilin ger avtalu við Landsverk um at fyrireika, prosjektera og bjóða út tær verkætlanir, sum eru komnar afturat,

síðani forprosjektið hjá P/F Suðuroyartunlinum, varð liðugt í 2023, uttan at hetta skakar leiklutabýtið millum P/F Suðuroyartunnilin, sum yvirskipaðan byggiharra, og Landsverk, sum góðkenningar- og eftirlitsmyndugleika. Talan er um farleiðina millum Sandoyartunnilin og Líðarenda og vegagerð millum Líðarenda og Suðuroyartunnilin umframt íbinding í vegin til Skarvanesar og vegin til Skálavíkar.

Politiska ynski er, at føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at átaka sær partar av verkætlanini og ætlanin er, at útbjóðingartilfarið verður soleiðis háttað, at til ber at bjóða uppá samlaðu verkætlanina, við og uttan tilhoyrandi tunnils- og vegakervum og partar av tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

**Kostnaður og fígging**

Búskaparráðið, Landsbankin og onnur hava alment ávarað ímóti at gera so stóra íløgu sum ein Suðuroyartunnil, áðrenn stig eru tikin til at betra um haldførið í almenna búskapinum.

Politiski fylgibólkurin er samdur um, at Suðuroyartunnilin er ein neyðug íløga, um gongdin í Suðuroynni skal vendast, og metir eisini, at talan kann gerast um eina íløgu, sum við tíðini kemur at verða góð fyri fíggjarlógina, tí verandi sjóvegis farleið er kostnaðarmikil.

Sum longu kunnugt, er talan um størstu íløgu í Føroyum nakrantíð. Áðrenn tunnilsverkætlanin er boðin út, og betri innlit er fingið í kostnaðin, er tað sjálvsagt eisini ein stór óvissa um fíggjarligu avleiðingar av samlaðu verkætlanini.

Modellið fyri fíggingarleistin (fylgiskjal 11) og kost-nyttu greiningarnar (fylgiskjal 13) geva í løtuni eitt yvirskipað fíggjarligt yvirlit yvir verkætlanina, og seinni, tá ið útboð hava verið, heldur arbeiðið við at greina verkætlanina og vandarnar fram, áðrenn tann endaliga avgerðin um ein Suðuroyartunnil skal takast.

Greitt er, at ein fíggjarligur váði er knýttur at verkætlanini, og at kost-nyttu greiningarnar út frá einum reinum búskaparligum sjónarmiði ikki mæla til at fremja verkætlanina. Tó eru onnur yvirskipað atlit í mun til støðuna í Suðuroy og samhaldsfestið í Føroyum, sum eisini mugu takast við, tá endaliga avgerðin um verkætlanina skal takast.

Samanumtikið vísir uppskot til fíggingarleist (fylgiskjal 11), hvussu verkætlanin at gera Suðuroyartunnil kann ávirka fíggjarlógina.

Hvussu ávirkanin verður veldst í stóran mun um kostnaðin av tunlinum og hvussu høgt kapitalinnskot landið setir í verkætlanina, áðrenn tunnilin verður liðugur. Tó skal ein vera varugur við, at størsti parturin av kapitalinnskotinum kemur frá játtan á fíggjarlógini, sum eisini skal fíggjast.

Kostnaðurin av verandi farleið um Suðuroyarfjørð er høgur og varandi. Tí verður sparingin á fíggjarlógini lutfalsliga høg, tá tunnilin er liðugur og sjóvegis farleiðin verður niðurløgd.

Heldur enn at bara lata standa til, meðan støðan í Suðuroy bara versnar, hevur løgmaður í semju við politiska fylgibólkin gjørt av, at taka fyrsta stigið at fremja verkætlanina at gera ein Suðuroyartunnil.

Samstundis eru bæði løgmaður og politiski fylgibólkurin tilvitað um, at óvissan um kostnaðin framvegis er stór, og at tað kann vísa seg, at kostnaðurin av tunlinum gerst munandi hægri enn væntað verður í løtuni, og at kostnaðurin eisini kann gerast ov høgur og tyngjandi fyri fíggjarlógina, politiska rásarúmið og haldførið.

Tí fevnir inniverandi uppskot um lógarheimild og játtan til fyrireiking, prosjektering og útbjóðing av verkætlanini.

Um Løgtingið samtykkir at halda áfram og at veita neyðuga játtan, verður arbeitt miðvíst víðari við verkætlanini soleiðis, at verkætlanin kann bjóðast út.

Tá verkætlanin hevur verið í útboði og kostnaðarmetingin neyvari, skal politisk støða takast til um tunnilsverkætlanin skal fremjast.

Vísir tað seg, at kostnaðurin er ov høgur, so hevur politiska skipanin møguleika at steðga. Tí er man sinnaður at taka fyrsta stigið, sum við 200 mió. kr. á fíggjarlógini komandi 2 árini (2025-2026), bert hevur avmarkaðan fíggjarligan váða við sær.

Vísir tað seg hinvegin, tá tilboðini eru komin inn, at kostnaðurin er á einum støði, sum ikki tyngir fíggjarlógina, fíggjarliga rásarúmið og haldførið ov nógv, samstundis sum politiskur vilji til at fremja verkætlanina og gera Suðuroyartunnilin, verður hetta gjørt við serstakari løgtingslóg.

Umframt at geva endaliga heimild at gera Suðuroyartunnilin, verður eisini ásett í serstøku løgtingslógini, hvussu nógvan pening neyðugt verður at seta av á fíggjarlógini komandi árini, og hvussu nógvan pening P/F Suðuroyartunnilin skal læna frá landskassanum fyri at fremja verkætlanina.

**1.1. Orsakir til uppskotið**
Politisk semja er um at halda fram við verkætlanini Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum. Næsta stig í tilgongdini er at fyrireika, prosjektera, bjóða út verkætlanirnar og at gera arbeiðsvegir og tunnilsmunnar báðumegin undirsjóvartunnilin. Neyðugt er, at P/F Suðuroyartunnilin fær heimild til tess í lóg.

**1.2. Galdandi lóggáva**
P/F Suðuroyartunnilin varð stovnað við 4 mió. kr. í partapeningini, sum varð játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 við tí endamáli at gera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy.

Løgtingið hevur harafturat játtað 10 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2023 og aðrar 10 mió. kr. í 2024 til forkanningar av einum møguligum Suðuroyartunli. Higartil hevur P/F Suðuroyartunnilin arbeitt við at fyrireika Suðuroyartunnilin sambært heimildini á fíggjarlógini. Tað finst ongin serlóggáva, sum skipar virksemi hjá felagnum ella ásetir, hvørjar heimildir felagið hevur í mun til Suðuroyartunnilsverkætlanina.

Til samanberingar kann nevnast, at P/F Eystur- og Sandoyartunnil varð stovnað við heimild í løgtingslóg um at stova partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

Við løgtingslóg nr. 63 frá 22. mai 2023 varð heimild givin til, at P/F Suðuroyartunnilin ókeypis skuldi fáa ymiskt tilfar, sum Landsverk hevði gjørt viðvíkjandi ætlaða undirsjóvartunlinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at samtykkja at farast skal víðari við ætlanini at byggja Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Við uppskotinum verður tó ikki endaliga samtykt at fara undir tunnilsgerðina. Hetta verður avgjørt seinni við eini serstakari løgtingslóg, eftir at verkætlanin er liðugt fyrireikað og prosjekterað og at tilboðini eru innkomin, og neyvari greiða er fingin á, hvør kostnaðurin gerst av tunlinum.

Endamálið við hesum uppskotinum er at skipa virksemið hjá P/F Suðuroyartunlinum við lóg og at geva heimild fyri, at arbeiðið við undirsjóvartunlinum millum Suðuroy og Sandoy við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum kann halda fram.

Endamálið er at fáa til vega eina neyvari kostnaðarmeting av verkætlanini við at geva P/F Suðuroyartunlinum heimild til at prosjektera og bjóða út verkætlanina um undirsjóvartunnilin millum Suðuroy og Sandoy, tunnilin millum Sandvík og Hvalba og vegagerð í Sandvík, Hvalba og á Sandi.

Endamálið við arbeiðsvegum og inntøkum til undirsjóvartunnilin er at fyrireika verkætlanina, so skjótt kann verða farið í gongd við hana, um Løgtingið við serstakari løgtingslóg, tá tilboðini eru innkomin og neyvari kostnaðarmeting er gjørd, samtykkir at fara í gongd við tunnilsgerðina.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið staðfestir politiska semju um at arbeiða víðari við Suðuroyartunnilsverkætlanini og staðfestir, at tað verður P/F Suðuroyartunnilin, sum kemur at verða byggiharri fyri allari verkætlanini.

Uppskotið skipar somuleiðis virksemið hjá P/F Suðuroyartunlinum við ásetingum um m.a. ognarviðurskifti og virkisøki hjá nevndini. Uppskotið hevur ikki ásetingar um, at P/F Suðuroyartunnilin er fevnt av innlitslógini og fyrisitingarlógini.

Verður uppskotið samtykt hevur Løgtingið tikið eina avgerð um at farast skal víðari við ætlanini at byggja Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, uttan endaliga at samtykkja at farast skal undir at byggja Suðuroyartunnil.

Endaliga avgerðin verður tikin seinni við eini serstakari løgtingslóg, eftir at verkætlanin er liðugt fyrireikað, prosjekterað og tilboðini eru innkomin, umframt at neyvari greiða er fingin á, hvør kostnaðurin gerst av tunlinum.

Við uppskotinum verður gjørt greitt, at verkætlanin fevnir um undirsjóvartunnil millum Skarvanes og Sandvík; tunnil millum Sandvík og Hvalba; farleið frá Líðarenda til Sandoyartunnilin í Traðardali; vegagerð frá Líðarenda til tunnilsmunna í Djúpadali, við íbinding í verandi veg til Skarvanesar; tunnilsveg í Sandvík og umfarsveg í Hvalba.

Harvið verður greitt, hvør uppgávan hjá P/F Suðuroyartunlinum er og hvørjar heimildir felagið hevur í mun til uppgávurnar.

Tá ið tilboðini eru innkomin, og kostnaðurin fyri tunnilin er komin í eina trygga legu, verður við serstakari løgtingslóg endaliga gjørt av, um prosjektið skal fremjast.

Samstundis verður mett um, hvussu nógvan pening neyðugt er at seta av á fíggjarlógini tey komandi árini fyri at alt skal hanga saman fíggjarliga.

Eisini verður ásett í lógini, hvørjar peningaupphæddir landskassin skal læna P/F Suðuroyartunlinum. Endaliga gongdsetingin av Suðuroyartunlinum fer lógartekniskt fram við serstakari lóg.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá viðkomandi myndugleikum, almennum stovnum og hevur ligið til ummælis á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni, so at borgarar, privatir felagsskapir og áhugafeløg fingu møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið.

- P/F Suðuroyartunnilin
- Landsverk
- Jarðfeingi
- Fíggjarmálaráðið
- Løgmálaráðið
- Umhvørvismálaráðið
- Kommunufelag Føroya við áheitan um at senda víðari til borgarstjórar og bygdaráðslimir í Suðuroynni og Sandoynni.
- Landsbanki Føroya
- Føroyar Arbeiðsgevarafelag
- Vinnuhúsið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Inniverandi uppskot er fyrsta stigið at fremja Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum. Uppskotið gevur heimild til at prosjektera og bjóða út verkætlanina, og eisini heimild at gera arbeiðsvegir og inntøk til tunnilsmunnar báðumegin undirsjóvartunnilin.

Í lýsingunum av avleiðingunum av uppskotinum verður tað tí greitt, hvørjar avleiðingar inniverandi uppskot hevur, og í ein ávísan mun verður eisini víst á, hvørjar avleiðingar væntast, um Løgtingið seinni ger av við serstakari løgtingslóg at fremja samlaðu verkætlanina.

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

*Avleiðingar fyri landið*
Í 2023 og 2024 vórðu játtaðar tilsamans 20 mió. kr. til at fyrireika undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við tilhoyrandi vegagerð v.m. Forkanningarnar eru so gott sum lidnar.

Inniverandi uppskot gevur heimild til at P/F Suðuroyartunnilin fer undir at prosjektera og bjóða út verkætlanina um undirsjóvartunnilin millum Suðuroy og Sandoy, tunnilin millum Sandvík og Hvalba, farleið frá Líðarenda til Sandoyartunnilin í Traðardali, vegagerð frá Líðarenda til tunnilsmunna í Djúpadali, við íbinding í verandi veg til Skarvanesar, tunnilsveg í Sandvík og umfarsveg í Hvalba.

Endamálið er at fáa til vega neyvari kostnaðarmeting av verkætlanina.

Harumframt verður heimild hjá P/F Suðuroyartunlinum at gera, arbeiðsvegir og inntøk til tunilsmunnar báðumegin undirsjóvartunnilin so farast kann skjótt í gongd við verkætlanini, um Løgtingið samtykkir tað.

Landið setur 100 mió. kr. í felagið í 2025 og aftur 100 mió. kr. í 2026, sí eisini uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2025 (høvuðskonto 2.38.2.31). Upphæddin er partur av samlaða íløgukarminum hjá landinum, sum eftir ætlanin fer at liggja um 600 mió. kr. árliga (í 2024-prísum) komandi árini.

Tá verkætlanin hevur verið í útboði og ein meira neyv kostnaðarmeting fyriliggur, skal støða takast til, um eitt uppskot til serstaka løgtingslóg skal leggjast fram, sum gevur P/F Suðuroyartunlinum heimild til at fremja verkætlanina. Í sambandi við serstaka løgtingslóg skal eisini verða lýst nærri, hvussu verkætlanin kann fíggjast, og hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri landsins fíggjarstøðu at fremja hana. Víst verður til fylgiskjal 7, sum lýsir eitt uppskot til fíggingarleist fyri Suðuroyartunnilin.

**Kostnaðarmeting av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnils - og vegakervum**
P/F Suðuroyartunnilin hevur alment upplýst, at ein kostnaðarmeting er gjørd, sum vísir ein prís á uml. 4 mia. kr. (í 2024-prísum). Hetta er uttan íbinding til Skúgvoy, men har møguligt er at knýta Skúgvoy uppí seinni Í Sandoynni er vegur til at binda í landsvegakervi íroknaður, men ikki onnur atknýtt vega- og tunnilskervi. Í Suðuroynni eru Sandvíkartunnil og vegir at binda í núverandi landsvegakervi í Suðuroy er íroknað.

Kostnaðarmetingin byggir á eitt forprosjekt fyri Suðuroyartunnilin, sum Norconsult hevur staðið fyri. Orsakað av fyriliti fyri komandi útboði, og fyri at verja fíggjarligu áhugamálini hjá P/F Suðuroyartunlinum og tí almenna, er einki alment innlit í kostnaðarmetingina, sbrt. løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, §13, nr. 5 og nr. 6. Í sambandi við eitt útboð kann kunnleiki til smálutirnar í kostnaðarmetingini ávirka tilboðsgevararnar og hava við sær, at prísurin á verkætlanini verður hægri enn neyðugt.

Yvirskipað vísir kostnaðarmetingin, at sjálvur undirsjóvartunnilin millum Skarvanes og Sandvík fer at kosta uml. 3,5 mia. kr. (í 2024-prisum)

Sandvíkartunnilin við vegakervum og umkoyringarvegi í Hvalba verða mettir at kosta uml. 400 mió. kr., og trygdarrúm eru mett at kosta uml. 100 mió. kr.

Kostnaðurin av atknýttum vegum og møguligum tunlum í Sandoynni veldst um, hvør farleið verður vald. Ein leyslig meting er kosta áleið 170 mió. kr.

Samlaði kostnaðurin av verkætlanini er soleiðis mettur til uml. 4,17 mia. kr. (í 2024-prísum) íroknað atknýttir vegir og møguligan tunnil í Sandoynni.

Møguleiki er seinni at knýta Skúgvoy uppí Suðuroyartunnilin. Mett verður, at tað kostar millum 200 og 400 mió. kr. alt eftir, hvør linjuføringin verður at knýta Skúgvoy uppí verkætlanina.

Stytsta linjuføring verður mett at kosta áleið 200 mió. kr. og hevur við sær, at hallið á "uppkoyringini" verður 12,5%, sum er munandi hægri enn í øðrum tunlum og minnir um Mannbrekku í Hoyvík.

Umráðandi er, at spurningurin um, hvørja og hvussu nógva ferðslu Skúgvoy kann bera, verður viðgjørdur nærri, áðrenn støða verður tikin.

Verður Skúgvoy knýtt at verkætlanini við Suðuroyartunlinum, verður byggitíðarskeiðið væntandi longt nakað.

Landsverk hevur eftirkannað kostnaðarmetingina hjá tunnilsfelagnum. Sí fylgiskjal 18.

Tunnilsfelagið hevur eina kostnaðarmeting á umleið 3,9 mia. kr. (í 2024-prísum) við avleiddum verkætlanum, sum eru Sandvíkartunnilin, umfarsvegur í Hvalba og tunnilsvegur, men ikki íroknað atknýttir vegir og møguligan tunnil á Sandoynni. Av upphæddini eru 400 mió. kr. til Sandvíkartunnilin og umfarsveg í Hvalba.

Eftirkanningin hjá Landsverki vísir, at við at brúka føroyskar eindarprísir fyri nýggjastu undirsjóvar- og landstunlarnar, er kostnaðarmetingin hægri enn verandi kostnaðarmeting hjá tunnilsfelagnum. Kostnaðarmetingin hjá Landsverki er umleið 0,6 – 1,0 mia. kr. hægri.

Eftirkanningin vísir eisini, at tað eru týðandi munir í spjaðingini av kostnaðarmetingum, sum kunnu hava við sær, at váðin verður undirmettur. Samanumtikið eru fleiri týðandi óvissur, ið Landsverk mælir til verða kannaðar nærri, áðrenn farið verður undir verkætlanina.

Givið er, at ein neyv kostnaðarmeting ikki fæst, fyrr enn verkætlanin er prosjekterað, boðin út og tilboðini eru komin inn.

**Fíggingarleistur**
Í 2023 varð farið undir at lýsa og menna uppskot til ein fíggingarleist fyri ein møguligan Suðuroyartunnil. Sí fylgiskjal 11, sum lýsir eitt uppskot til fíggingarleist fyri Suðraroyartunnil.

Samanumtikið vísir uppskot til fíggingarleist, at verkætlanin at gera Suðuroyartunnil hevur ávirkan á fíggjarlógina.

Hvussu stór ávirkanin verður veldst í stóran mun um kostnaðin av tunlinum og hvussu høgt kapitalinnskot landið setir í verkætlanina, áðrenn tunnilin verður liðugur. Tó skal ein vera varugur við, at størsti parturin av kapitalinnskotinum kemur frá játtan á fíggjarlógini.

Kostnaðurin av verandi farleið um Suðuroyarfjørð er høgur og varandi. Tí verður sparingin á fíggjarlógini lutfalsliga høg, tá tunnilin er liðugur og sjóvegis farleiðin verður niðurløgd.

Í frágreiðingini um fíggingarleist fyri Suðuroyartunnil frá oktobur 2024, verður víst á, at kostnaðarmetingar altíð skulu takast við fyrivarnum. Í sambandi við, at Landsverk varð biðið um eina meting av kostnaðarmetingini hjá P/F Suðuroyartunlinum, mælir Landsverk til, at verkætlanin og kostnaðarmeting verða góðskutryggjað av uttanhýsis parti, áðrenn endalig støða verður tikin til at fremja eina verkætlan.

Í frágreiðingini verður eisini víst á, at ein neyvari kostnaðarmeting fæst ikki fyrrenn verkætlanin er prosjekterað, boðin út og tilboðini upp á at gera undirsjóvartunnilin og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi eru komin inn.

Í frágreiðingini um fíggingarleist er roynt at geva eitt yvirskipað yvirlit yvir, hvussu verkætlanin fer at ávirka fíggjarlógina yvir eitt longri tíðarskeið út frá nøkrum givnum fortreytum. Myndin niðanfyri vísir til dømis miðal árligu ávirkanina á fíggjarlógina í tíðarskeiðnum 2035-2064 við ymiskum fortreytum um prísin á tunlinum og kapitalinnskot. Aftanfyri úrslitini í talvuni eru eisini nakrar fortreytir um lántøku, rentu, ferðslu og kostnaðir við at halda verandi farleið o.a. Fyri nærri kunning um fortreytirnar verður víst til frágreiðingina um fíggingarleist.

Út frá nøkrum givnum fortreytum, sum til dømis at rentan á láninum til tunnilsverkætlanina er 3,5 %, vísir talva 1 niðanfyri m.a., at um tunnilsverkætlanin kostar 4 mia. kr., og beinleiðis kapitalinnskot verður á 1,35 mia. kr., fer hetta at hava eina jaliga ávirkan á fíggjarlógina við umleið 40 mió. kr. árliga í tíðarskeiðnum 2035-2064 í mun til at halda fram við verandi farleið.

Um tunnilin hinvegin kostar 5,2 mia. kr., fer verkætlanin at hava eina neiliga ávirkan á fíggjarlógina við uml. 35 mió. kr. árliga, treytað av, at hinar fortreytirnar eru óbroyttar.

**Talva 1: Nettoávirkan árliga á fíggjarlógini 2035-2064 við ymiskum samansetingum av innskoti og tunnilskostnaði (1.000 kr.)**

| | | Tunnilskostnaður | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **4.000.000** | **4.200.000** | **4.400.000** | **4.600.000** | **4.800.000** | **5.000.000** | **5.200.000** |
| | **350.000** | -23.841 | -23.841 | -23.841 | -23.841 | -23.841 | -23.841 | -23.841 |
| | **850.000** | 8.027 | -4.435 | -16.897 | -29.360 | -41.822 | -54.284 | -66.751 |
| | **950.000** | 14.382 | 1.919 | -10.543 | -23.005 | -35.468 | -47.930 | -60.392 |
| | **1.150.000** | 27.090 | 14.628 | 2.166 | -10.297 | -22.759 | -35.221 | -47.684 |
| | **1.350.000** | 39.799 | 27.337 | 14.874 | 2.412 | -10.050 | -22.513 | -34.975 |
| | **1.550.000** | 52.508 | 40.045 | 27.583 | 15.121 | 2.658 | -9.804 | -22.267 |
| **Kapital-** | **1.750.000** | 65.216 | 52.754 | 40.291 | 27.829 | 15.367 | 2.905 | -9.558 |
| **innskot** | **1.950.000** | 77.925 | 65.462 | 53.000 | 40.538 | 28.075 | 15.613 | 3.151 |
| | **2.150.000** | 90.633 | 78.171 | 65.709 | 53.246 | 40.784 | 28.322 | 15.859 |
| | **2.350.000** | 103.342 | 90.880 | 78.417 | 65.955 | 53.493 | 41.030 | 28.568 |
| | **2.550.000** | 116.051 | 103.588 | 91.126 | 78.664 | 66.201 | 53.739 | 41.277 |
| | **2.750.000** | 128.759 | 116.297 | 103.835 | 91.372 | 78.910 | 66.448 | 53.985 |
| | **2.950.000** | 141.468 | 129.006 | 116.543 | 104.081 | 91.618 | 79.156 | 66.694 |

Úr frágreiðingini um fíggingarleist ber til at fáa eina fatan av, hvussu stóran týdning rentan av láninum til tunnilsverkætlanina hevur á úrslitið á fíggjarlógini. Í dømunum niðanfyri, talva 2, er gingið út frá einum kapitalinnskoti á 1,35 mia. kr., meðan hinar fortreytirnar eru tær somu sum omanfyri, undantikið rentan sum broytist.

**Talva 2: Nettoávirkan árliga á fíggjarlógini 2035-2064 við ymiskari rentu (1.000 kr.)**

| | | Tunnilskostnaður | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **4.000.000** | **4.200.000** | **4.400.000** | **4.600.000** | **4.800.000** | **5.000.000** | **5.200.000** |
| | **2,00%** | 74.012 | 64.361 | 54.710 | 45.059 | 35.408 | 25.757 | 16.106 |
| | **2,25%** | 67.613 | 57.441 | 47.269 | 37.097 | 26.925 | 16.753 | 6.581 |
| | **2,50%** | 63.225 | 52.694 | 42.164 | 31.633 | 21.103 | 10.572 | 42 |
| | **2,75%** | 56.458 | 45.373 | 34.287 | 23.202 | 12.116 | 1.031 | -10.055 |
| | **3,00%** | 51.823 | 40.356 | 28.889 | 17.422 | 5.955 | -5.512 | -16.979 |
| | **3,25%** | 44.684 | 32.627 | 20.570 | 8.513 | -3.544 | -15.601 | -27.659 |
| **Renta** | **3,50%** | 39.799 | 27.337 | 14.874 | 2.412 | -10.050 | -22.513 | -34.975 |
| | **3,75%** | 32.282 | 19.194 | 6.105 | -6.983 | -20.071 | -33.160 | -46.248 |
| | **4,00%** | 27.144 | 13.626 | 108 | -13.410 | -26.928 | -40.445 | -53.964 |
| | **4,25%** | 19.246 | 5.065 | -9.116 | -23.297 | -37.478 | -51.659 | -65.840 |
| | **4,50%** | 13.853 | -783 | -15.418 | -30.054 | -44.689 | -59.325 | -73.960 |
| | **4,75%** | 5.570 | -9.766 | -25.103 | -40.439 | -55.776 | -71.112 | -86.448 |
| | **5,00%** | -80 | -15.897 | -31.713 | -47.530 | -63.347 | -79.163 | -94.980 |

**Kost-nyttu greining av Suðuroyartunlinum**
Sum partur av forkanningini av Suðuroyartunlinum gjørdi Landsverk í 2021 eina kost-nyttu greining av fimm ymiskum møguleikum í mun til verandi farleið til Suðuroyar (fylgiskjal 16).

Kost-nyttu greiningarhátturin verður aloftast brúktur altjóða til at meta um almennar íløgur í infrakervið. Høvuðsendamálið við kost-nyttu greiningini er at lýsa tær samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar, áðrenn valt verður millum ymiskar loysnir.

Løgmansskrivstovan hevur biðið Landsverk um at gera eina dagførda kost-nyttu greining, sum er í tráð við ætlanina hjá politiska myndugleikanum um at gera ein undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna, sí fylgiskjal 13.

Ítøkiliga varð biðið um, at hesar linjuføringar vórðu kost-nyttu greinaðar:
- Skarvanes-Sandvík, og
- Skarvanes-Sandvík við tunli upp í Skúvoy (+400 mió. kr.).

Dagførda kost-nyttu greiningin hjá Landsverki vísir, at verkætlanin at byggja ein Suðuroyartunnil, uttan tunnil upp í Skúgvoy, hevur eitt negativt nettonútíðarvirði (NNV) á ávikavist -88 mió. kr. yvir eitt verkætlanarskeið á 50 ár, um tunnilskostnaðurin er 3,5 mia. kr., -557 mió. kr., um tunnilskostnaðurin er 4,0 mia. kr., og -1.495 mió. kr., um tunnilskostnaðurin er 5,0 mia. kr. Tunnilskostnaðurin er í hesum føri einans fyri sjálvan undirsjóvartunnilin. Umframt sjálvan tunnilskostnaðin eru avleiddar verkætlanir, sum Landsverk hevur mett til slakar 1 mia. kr. við einum váðaískoyti á 40 %, og sum eru tiknar við í kost-nyttu greiningina.

At nettonútíðarvirðið er negativt merkir, at frá einum búskaparligum sjónarhorni eiga hesar íløgurnar ikki at fremjast, tí tær geva eitt samfelagsbúskaparligt tap. Hinvegin gevur íløgan bert eitt avmarkað tap um sjálv tunnilsíløgan er 3,5 mia. kr., umframt avleiddar verkætlanir fyri uml. 1,0 mia. kr. Her skal gerast vart við, at Landsverk metir at tunnilskostnaður áljóðandi 3,5 mia. kr. er bjartskygd og tí lítið sannlík.

Kost-nyttu greiningin vísir, at úrslitið er serliga viðbrekið fyri broytingum í tunnilskostnaðinum og útreiðslunum til rakstur av ferjum, herundir íløgur í nýggjar ferjur.

Ein kost-nyttu greining tekur tó ikki hædd fyri øllum og hevur sínar avmarkingar.

Kost-nyttu greining tekur m.a. ikki við allar kvalitativar avleiðingar, so sum eina sameining av bústaðarmarknaðinum og økismenning í Suðuroy, men sambært Landsverk broytir tað helst ikki niðurstøðuna.

Kost-nyttu greiningin er løgd við sum fylgiskjal 13.

*Avleiðingar fyri kommunur*
Uppskotið kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur, sum skulu dagføra brunaøkið og gera tillagingar til øktu ferðsluna í lokaløkinum.

Upplýsast skal, at undirsjóvartunnilin og aðrir tunlar verða partur av einari almennari tilbúgvingarætlan, um teir verða bygdir.

Tilbúgving er eitt kommunalt øki, og vísast kann til loysnina, sum Tórshavnar kommuna og kommunurnar á Sandoynni gjørdu í sambandi við at Sandoyartunnilin lat upp.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Samlaða verkætlanin er umfatandi og fer at hava umsitingarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur. Tað verða fleiri myndugleikar, sum fara at hava ein leiklut í teimum ymisku

stigunum í verkætlanini. Umráðandi er, at P/ F Suðuroyartunnilin í sambandi við fyrireiking og prosjektering av verkætlanini, nágreinar, hvørji loyvi og góðkenningar krevjast frá øðrum myndugleikum, og at neyðug loyvi fyriliggja, áðrenn farið verður undir at fremja ætlanina. Neyðug tíð og orka má setast av til samskiftið millum P/F Suðuroyartunnilin og avvarðandi myndugleikar á økinum.

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um, at P/F Suðuroyartunnilin er fevnt av innlitslógini og fyrisitingarlógini.

Upplýsast skal, at heimild er í § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina og § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg at seta bæði innlitslógina og fyristingarlógina í gildi fyri P/F Suðuroyartunnilin við kunngerð.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørjir myndugleikar fara at hava ein leiklut í sambandi við verkætlanina. Givið er, at tað helst verða fleiri myndugleikar og stovnar.

**Landsverk**
Í undanfarnu lógum um at byggja undirsjóvartunlar í Føroyum hevur verið galdandi, at Landsverk skal góðkenna samlaða prosjektið, og eisini hevur verið ásett, at Landsverk skal hava eftirlit við sjálvari byggingini.

Uppskotið hevur við sær arbeiðsbyrðu til Landsverk, sum skal góðkenna prosjektini áðrenn arbeiðið kann bjóðast út, og eisini skal hava eftirlit við sjálvari byggingini. Hetta fyri at tryggja ferðslufakligu dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervið annars.

Landsverk skal eftir hvørt stig í prosjekteringunum fáa tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til góðkenningar og skal harafturat, vegna landsstýrisfólkið, góðkenna endaligu prosjektini.

Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar sambært samsvarandi góðkendum prosjektum. Landsverk skal hava atgongd til viðkomandi tilfar hjá P/F Suðuroyartunlinum.

Uppskotið hevur áseting um, at Suðuroyartunnilin ikki er partur av landsveganetinum sambært løgtingslóg um landsvegir við seinni broytingum. Tó ásetir uppskotið, at arbeiðið við Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fer fram eftir somu reglum sum fyri landsvegagerð, og at landsstýrismaðurin hevur tær heimildir, sum eru ásettar í løgtingslóg um landsvegir viðvíkjandi ferðslu, vegum og tunlum.

Uppskotið nágreinar at skipan av ferðsluni í tunlunum fer fram eftir somu reglum og leiðreglum sum fyri landsvegir. Lógirnar hava eisini havt sum fyritreyt, at tunnilseigarin hevur rætt til, uttan gjald, at binda í landsveganetið.

Felagið hevur tó ikki somu royndir við at standa fyri vega- og tunnilsverkætlanum á landi. Tí er ætlanin, at felagið letur partar av uppgávunum til Landsverk, sum varar av landsvegakervinum, og tí hevur drúgvar royndir og holla vitan at standa fyri tunnils- og vegagerð á landi í Føroyum.

Mett verður, at tað tænir samlaðu verkætlanini, at P/F Suðuroyartunnilin ger avtalu við Landsverk um at fyrireika, prosjektera og bjóða út tær verkætlanir, sum eru komnar afturat, síðani forprosjektið hjá P/F Suðuroyartunlinum varð liðugt í 2023, uttan at hetta skakar

leiklutabýtið millum P/F Suðuroyartunnilin, sum yvirskipaðan byggiharra, og Landsverk, sum góðkenningar- og eftirlitsmyndugleika. Talan er um atknýttu verkætlanirnar á Sandoynni.

**Umhvørvisstovan**
Í sambandi við, at verkætlanirnar verða fyrireikaðar og prosjekteraðar, verða eisini umhvørvisárinskanningar gjørdar, og P/F Suðuroyartunnilin skal hava neyðuga umhvørvisgóðkenningar frá Umhvørvisstovuni av verkætlanunum, eins og tá Eysturoyar- og Sandoyartunnilin varð gjørdur.

Í sambandi við møguliga ognartøku er neyðugt, at Umhvørvisstovan góðkennir frábýti og matrikulerar sjálvan portalin.

**Friðingarmyndugleikar**
Um tunnilsmunnarnir liggja nær sjónum ella í uttangarðslendi v.m., so skal friðingarmyndugleikin góðkenna byggingina, t.v.s. staðsetingina av sjálvum tunnilsmunnanum og nýggjum tilhoyrandi vegum.

Í sambandi við verkætlanina at byggja ein Suðuroyartunnil er ein spurningur um at fáa greiðu á, hvar grótgoymslurnar skulu liggja.

Í hesum sambandi skal friðingarmyndugleikin, t.e. lokala friðingarnevndin og Yvirfriðingarnevndin, góðkenna staðsetingina av grótgoymslum, tí hesar fara helst at liggja í uttangarðsøki. Roknast má tí við, at staðsetingin av grótgoymslum skal góðkennast av friðingarmyndugleikanum og byggivaldinum á staðnum, um staðsetingin er partur av byggisamtyktini.

**Búnaðarstovan**
Í sambandi við byggingina av Eystur- og Sandoyartunlum hevur Búnaðarstovan havt ein týðandi leiklut í sambandi við útvegan av lendi til vegagerð til tunnilsmunnan og við staðseting av grótdepotum v.m, tá talan hevur verið um festijørð.

**Arbeiðseftirlitið**
Tá arbeiðið fer í gongd, skal Arbeiðseftirlitið góðkenna byggiplássið. Um arbeiðstakarin nýtir útlendska arbeiðsmegi, skulu eisini neyðug loyvir fáast til vega frá útlendingastýrinum v.m.

**Jarðfeingi**
Jarðfeingi hevur og fer framhaldandi at hava ein virknan leiklut í sambandi við at útvega jarðfrøðisligt grundarlag undir verkætlanini. Vanligt er, at Jarðfeingi fylgir upp á jarðfrøðina í byggitíðini við skrásetingum í tunlinum. Eisini skal Jarðfeingi fáa í varðveitslu sjáldsom grótsløg og soðsteinar.

**Kommunur**
Kommunurnar, sum liggja har sum undirsjóvartunnilin og tunlarnir hava tunnilsmunnar, fara at hava ein ávísan leiklut í sambandi við, at verkætlanirnar verða fyrireikaðar og prosjekteraðar. Nógvir spurningar eru at taka støðu til í sambandi við eina so stóra og umfatandi verkætlan sum hesa.

Kommunurnar skulu geva byggiloyvi til arbeiðsskúrar og í prinsippinum skal kommunan eisini góðkenna reglur um frárensl og dálking frá sjálvum tunlinum.

Harumframt er neyðugt at viðgera spurningin um, hvørt ásetingar eru í lokalum byggisamtyktum, sum ikki loyva, at tunnilsmunnar og vegir verða bygd, og um neyðugt er at broyta byggisamtyktir.

**Tilbúgving**
Í sambandi við bygging av einum Suðuroyartunli er støðan tann, at ein tunnil eisini verður partur av einari almennari tilbúgvingarætlan.

Í hesum sambandi kann spurningur taka seg upp, hvussu tilbúgvingin kring tunnilsmunnarnar verður skipað.

Sambært galdandi lóg er hetta eitt kommunalt øki, og tí verður ikki mett, at tilbúgvingarmyndugleikin í sjálvum sær skal góðkenna tunnilsbyggingina.

Tilbúgvingarmyndugleikin eigur at verða tikin við upp á ráð, áðrenn byggingin verður sett í verk.

**Brunamyndugleikin**
Undirsjóvartunnilin og tunlarnir skulu brunagóðkennast. Tí verða eisini lokalu brunamyndugleikarnir tiknir við, tá verkætlanirnar verða prosjekteraðar.

**Løgreglan**
Løgreglan skal góðkenna skeltisætlanir, herundir møguligar avmarkingar, t.d. forboð fyri at fólk eru til gongu í tunlinum ella koyra við prutli og súkklum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Politiska ynski er, at føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at átaka sær partar av verkætlanini og ætlanin er, at útbjóðingartilfarið verður soleiðis háttað, at til ber at bjóða uppá samlaðu verkætlanina við og uttan tilhoyrandi tunnils- og vegakerv og partar av tilhoyrandi tunnils- og vegakerv.

Byggingin av einum Suðuroyartunli við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fer at hava stóran týdning fyri føroysku byggivinnuna. Orsøkin er, at ringvirkningar frá ein slíkari verkætlan eru sera stórir, tí nógvar føroyskar fyritøkur og arbeiðsfólk fara at verða knýtt at verkætlanini í eini 8-10 ár. Hetta var soleiðis, tá byggingin av Eystur- og Sandoyartunlunum bleiv gjørd.

Tá Suðuroyartunnilin verður liðugur, fer hann at hava sera stóran týdning, bæði fyri fólk og vinnu. Fyri fólk fer hann at hava stóran týdning, tí at arbeiðsmarknaðurin fer helst at økjast við øktum íløgum í vinnuvirksemi. Haraftrat fáa suðuroyingar betri møguleika at arbeiða aðrastaðni eins og fólk norðanfjørðs kunnu arbeiða í Suðuroynni, tá sambandið gerst munandi betur.

Fyri vinnuna í Suðuroynni fer ein Suðuroyartunnil at hava sera stóran týdning. Lættari verður at fá veitingar til oynna, eins og lættari verður at útflyta framleiddar vørur. Hugsast kann eisini, at vinnur, sum í dag hava torført við at klára seg í Suðuroy, í framtíðini fara at klára at standa seg í kappingini við vinnuna norðanfjørðs.

Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri vinnulívið.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Hetta uppskotið fer at hava avleiðingar fyri umhvørvið. Talan er um eina stóra og umfatandi verkætlan, sum fevnir bæði um undirsjóvartunnil, tunnil millum Sandvík og Hvalba, farleið frá Sandoyartunlinum til Líðarenda og frá Líðarenda til Suðuroyartunilin, umframt vegakerv í Suðuroynni.

Neyðugt er at taka hond um umhvørvisárin tíðliga í tilgongdini, og at fáa til vega neyðug loyvi frá avvarðandi myndugleikum, herundir frá Umhvørvisstovuni. Í sambandi við at verkætlanin verður fyrireikað, verða kanningar gjørdar av áríninum á umhvørvið, náttúruna, lívfrøðiliga margfeldið og inntrivum í lendi, sum stendst av samlaðu verkætlanini fyri at taka støðu til um linjuføring og staðseting av inntøkum ávirkar umhvørvið, náttúran og djóralív sum minst.

Tá slíkar verkætlanir verða bodnar út, verða sett strong umhvørviskrøv til tær fyritøkurnar, sum skulu standa fyri byggingini. Tá farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, verða umhvørvis krøv sett til byggifyritøkuna, sum skal standa fyri byggingini. Áðrenn farið verður undir byggingina mugu øll týðandi myndugleikaloyvi verða fingin til vega.

Í byggitíðarskeiðinum vera stór byggipláss við hvønn tunnilsmunna.

Undir byggingini verður vanliga talan um krøv til reinsan (botnfellan) av borivatni, sum verður leitt burtur av byggiplássinum, handfaran av oljuúrdráttum, handfaran av spreingitráði, larm v.m. Higartil hevur verið bygt eftir norskum reglum, og hesar hava rímiliga strong krøv til fyribyrgjan av ávirkan á umhvørvið. Serliga eru hesi viðurskiftini ein trupulleiki, um tunnilsmunnarnir liggja tætt at bygdum øki, ella sárbærum umhvørvi, so sum áum, vøtnum ella náttúruserstøkum økjum.

Boring, spronging og lastbilaferðsla kunna verða til bága fyri fugla- og djóralívið í Suðuroynni og á Sandoynni. Tí má arbeiðið skipast soleiðis, at tað er til minst møguligan ampa.

**Verkætlanirnar**

Bæði í Suðuroynni og á Sandoynni eru serstøk náttúru øki við nógvum fjølbroyttum djóra, plantu og fuglalív, sum hava týdning fyri øki og náttúruna í Føroyum sum heild, sum helst fara at verða ávirkað av verkætlanunum.

Sambært forprosjektinum, Suðuroyarleiðin, sum er viðfest sum fylgiskjal 2, verður víst á, at vegalinjan í Sandvík fer at ganga í gjøgnum træðir og vegurin kemur at liggja gott 400 m frá nærmastu sethúsum.

Ì Hvalba fer vegalinjan í gjøgnum træðir og at liggja tætt at Norðbergsvatni og Heygsvatni. Eisini fer vegalinjan at liggja tætt at íbúðarøkjum við Toftaveg, Snæbjarnarveg, Fjalstrøðini og Norðbergsvegi.

Á Sandoynni verður nýggjur vegur gjørdur frá Liðarenda til tunnilsmunnan í Djúpadali. Partur av hesum vegastrekki er í dag farleið til Skarvanes. Partur av verandi farleið til Skarvanes verður dagførd, og gamli vegurin til Skarvanes verður bundin í komandi høvuðsveg. Náttúran er merkt av torvheiðum og vøtnum.

Ferðslan gjøgnum Sands bygd fer at økjast, um undirsjóvartunnilin verður gjørdur.

Væntaða ferðslan gjøgnum Suðuroyartunnilin verður í fyrstuni áleið 1400 bilar um samdøgrið (báðar vegir).

Hetta kemur at merkjast, hóast talan ikki er um ovurhondsstóra ferðslu, sum krevur átrokandi dagføring av vegnum um Sands bygd.

Harumframt eru tað umleið 10 ár frá tí, at avgerð er tikin um ein undirsjóvartunnil, til tunnilin verður tikin í nýtslu. Tað gevur tíð at kanna møguleikarnar og fyrireika møguligar linjuføringar. Fyrireikingarnar eru tó longu so smátt farnar í gongd.

Vegurin um Sands bygd er høvuðsvegur, bæði til eystan bygdirnar á Sandoynni og til ein undirsjóvartunnil millum Skarvanes og Sandvík. og eigur at verða dagførdur.

P/F Suðuroyartunnilin hevur kannað tveir møguleikar.

Ein møguleiki er upprætting av verandi vegi, sum er vestan fyri vatnið, og hin møguleikin er ein nýggjur vegur eystan fyri vatnið, har uppdyrkingarvegur er í dag.

Báðar linjurnar verða bundnar í ávikavist við og norðanfyri skúlan og báðar linjur eru uml. 3,5 km langar og eru leysliga mettar at kosta uml. 70 mió. kr.

Lendið er ikki so avbjóðandi, og til ber at leggja grót frá tunnilsverkætlanini til síðis at brúka til vegagerðina.

**Grót**
Við hvønn endan av Suðuroyartunlinum verður runt roknað uml. 1 millión $m^3$ av avlopsgróti, umframt grót frá Sandvíkartunlinum og einum møguligum tunli í Sandalíð.

Ein stór grótnøgd er ein umhvørvisavbjóðing til greitt er, hvat grótið skal nýtast til.

Avbjóðingin við avlopsgrótinum er í sambandi við ein Suðuroyartunnil størri enn í undanfarnum verkætlanum, tí mongdirnar av gróti eru munandi størri í sama stað sammett við undanfarnar tunnilsverkætlanir.

Tá ið sprongt verður fyri undirsjóvartunlum, verða stórar nøgdir av spreingievni nýttar. Hetta merkir, at avlopsgrótið í høvuðsheitum er smágrót, umframt at styrkin á grótinum ofta er lítil, orsakað av hørðu spreingingunum og ymisku flágunum arbeitt verður ígjøgnum. Slagið, góðskan og støddin á avlopsgrótinum avmarka tí, hvat grótið kann nýtast til. Avlopsgrót úr tunnilsverkætlanum hevur áður verið nýtt sum fylligrót í vegir, og til dømis til havnabygging, víðkan av havnaløgum og líknandi.

Talan er um eitt tilfeingi, sum eigur at verða gagnnýtt til neyðugar uppfyllingar í landinum, so tað slepst undan at spreingja grótbrot eftir fyllugróti.

Nakað av grótinum kann nýtast til tilhoyrandi vegagerð og møguligar ljóðdoyvandi vollar framvið vegum. Onnur boð uppá verkætlanir, sum hava verið nevndar, eru til dømis at gera eina oyggj ella hálvoyggj norðanfyri Sandvík ella nærhendis Skarvanes ella at útbyggja Gomluræt.

Nýggju økini kundu síðani til dømis nýtast til vindmyllulundir, grøna orku ella til vinnuøki.

Royndirnar hjá Eystur- og Sandoyartunlinum P/F at finna avtakarar til grótið hava verið misjavnar. Tí hevur P/F Suðuroyartunnilin mælt til, at grótið verður lagt so tætt við tunnilsmunnarnar, sum gjørligt.

Hetta kann gerast sum ein meira varandi loysn, har grótið verður planerað út, lendið verður tillagað og mold løgd omaná, annaðhvørt til haga ella til bø.

Til ber eisini at gera eina loysn, har talan kann vera um eina fyribils loysn í eitt nærri ásett áramál, har grótið kann vera gagnnýtt til verkætlanir, sum hava tørv á gróti, fyri síðani at vera planerað og klætt við mold, tá áramálið er liðugt. Tunnilsverkætlanin tekur 8-10 ár. Hetta krevur, at grótið verður lagt í hægri rúgvur, og vil sostatt taka minni pláss og ávirka náttúruna minni samlað sæð. Sí annars fylgiskjøl 14 og 15 við uppskotum um staðseting av gróti í Djúpadali og í Sandvík.

Økt ferðsla í økinum fer óivað at hava við sær óljóð og luftdálking. Tó kann væntast, at størsti parturin av føroysku akførunum ikki brenna bensin og diesel, tá bygging av Suðuroyartunlinum er liðug, og tunnilin er tikin í nýtslu. Harvið verður útlátið av vakstrarhúsgassum avmarkað. Harafturat verður helst talan um eina munandi minking í útláti av vakstarhúsgassum, tá verandi sjóvegis farleið kann verða niðurløgd, um undirsjóvartunnilin verður veruleiki.

Sum sagt, verður neyðugt at taka hond um umhvørvisárin tíðliga í tilgongdini og at fáa til vega neyðug loyvi frá avvarðandi myndugleikum. Í sambandi við at verkætlanin verður fyrireikað og prosjekterað, verður eisini gjørd umhvørvisárinskanning, og verkætlanin skal eisini hava neyðuga góðkenning frá Umhvørvisstovuni.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Verður Suðuroyartunnilin bygdur, fer ávirkanin á Suðuroynna væntandi at verða hin sama, sum tá fast samband var gjørt til Vágarnar, Norðoyggjar og Sandoynna. Væntast kann, at minkingin í fólkatalinum fer at minka, arbeiðsloysið fer at falla og íløgur í t.d. vinnulívið fara at økjast. Víst verður annars til frágreiðingina “Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil” frá juni 2019 (Fylgiskjal 17). Hóast nøkur ár eru síðani, at frágreiðingin varð skrivað, verður ikki mett, at fyritreytir og niðurstøður eru broyttar. Harumframt kann væntast ávirkan á Sandoynna, at koyrandi ferðsla til og úr Suðuroynni verður umvegis Sandoynna.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið kann hava avleiðingar fyri fólk, sum búgva í Suðuroy og fólk, sum umhugsa at flyta til Suðuroyar, um Løgtingið samtykkir at fara víðari við ætlanini.

Í 2019 varð »Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil« handað landsstýrismanninum við samferðslumálum.

Í álitinum verður víst á, at tað er trupult at siga nakað eintýðugt um, hvussu fast samband við eitt meginøki ávirkar hugin at seta búgv og trivnaðin í einum útjaðara. Royndir, bæði í Føroyum og uttanlands, vísa, at tað er ymiskt.

Í Vágum hevur verið ein javnur vøkstur, síðani tunnilin kom í 2002, meðan gongdin í fólkatalinum í Norðuroyggjum, sum fingu fast undirsjóvarsamband í 2006, hevur verið tann sama, sum í landinum samanlagt.

Í álitinum verður eisini víst á, at møguleikin at flyta seg ímillum øki, skapar ikki av sær sjálvum økt fólkatal. Ofta eru onnur atlit, t.d. bústaðarmøguleikar, vælferðartænastur, trivnaðartilboð og starvsmøguleikar, sum hava størri týdning fyri, hvar man velur at seta búgv.

Sum útgangsstøði kann tó sigast, at fast samband hevur við sær ein størri arbeiðsmarknað og størri útboð av arbeiðsmegi, eins og tað kann geva nýggjar møguleikar at velja sær, bæði starvsleið og heimstað, tá man kann arbeiða eitt stað og búgva eitt annað.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið fevnir ikki um øki sum eru fevnd av millumtjóðasáttmálum, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005. Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna.

   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention*.

   Evropeiski Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evropeisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

   Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar avleiðingar fyri EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin fekk gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009. Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

   Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Verður undirsjóvartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum framdur, fáa fólk í Føroyum, sum bera brek og hava tørv á tænastum og viðgerð frá Heilsuverkið Føroya, við einum Suðuroyartunli léttari og betri atgongd til tey trý sjúkrahúsini í landinum. Harumframt fáa fólk, sum búgva í Suðuroynni og hava tørv á tænastum frá eitt nú sálarfrøðingi, léttari atgongd til tænasturnar, sum liggja á meginlandinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Uppskotið hevur ongar slíkar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.12. Gjøld**
Í uppskotinum § 7, stk. 1 er heimilað P/F Suðuroyartunlinum at áseta gjald fyri at koyra í gjøgnum tunnilin og at áseta støddina á gjaldinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Eftir § 1 áliggur tað P/F Suðuroyartunlinum at verða ábyrgdarhavandi byggiharri fyri Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Eftir § 6 áleggur lógaruppskotið P/F Suðuroyartunlinum at avhenda alt tunnils- og vegakervið, uttan sjálvan Suðuroyartunnilin, til landið fyri útveganarkostnað, tá ið verkætlanin er liðug.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í lógaruppskotinum § 2, stk. 3, 4 og 5 eru ávísar heimildir mótvegis partafelagnum lagdar til landsstýrisfólkið á økinum. Í § 8 er ein ognartøkuheimild givin til landsstýrisfólkið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Í § 8 er ein ognartøkuheimild løgd til landsstýrisfólkið á økinum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar. Men tá ið sjálvt íverksetingarlógaruppskotið verður lagt fram seinni kann tað hava aðrar avleiðingar, sum verða lýstar í tí uppskotinum.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í hesi grein er ásett, at P/F Suðuroyartunnilin kemur at standa fyri samlaðu verkætlanini, t.v.s. bæði undirsjóvartunli millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík, og eisini tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Tá hinir undirsjóvartunlarnir í Føroyum hava verið gjørdir, hevur man í fleiri førum havt trupulleikar av, at endalig avgerð ikki hevur verið tikin um linjuføringar fyri tilhoyrandi vegir og tunlar. Í sambandi við Norðoyatunnilin gingu fleiri ár, áðrenn semja var um, hvar vegurin gjøgnum Leirvík skuldi ganga frá Norðoyatunlinum til Leirvíkstunnilin. Í sambandi við Eysturoyartunnilin var ósemja um, hvør skuldi rinda fyri innkoyringarveg til Havnar og fyri veg gjøgnum ella fram við Runavík. Ikki fyrr enn eftir at undirsjóvartunnilin var tikin í nýtslu, gjørdu landið og avvarðandi kommunur semju um, at landið rindaði ein part, og kommunurnar ein part av vegaføringini, sum leiddi ferðsluna frá undirsjóvartunlinum til kommunalar vegir, og framvegis eru allir hesir vegir ikki lidnir.

Politiska ynskið hevur verið, at talan skal verða eina samlaða verkætlan, sum fevnir, bæði um undirsjóvartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi, fyri at tryggja, at øll vegastrekki eru við, at verkætlanirnar eru samskipaðar, og at verkætlanin verður framd á mest skynsama hátt búskaparliga.

At partafelagið stendur fyri samlaðu verkætlanini skal tryggja, at arbeiðið at gera undirsjóvartunnil verður samskipað við arbeiðið at gera tilhoyrandi vegir og tunlar, og soleiðis minka um vandan fyri, at til- og frákoyringarvegir ikki eru lidnir og klárir at taka í nýtslu í seinasta lagi, tá koyrandi verður gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Fleiri av teimum feløgum, sum vóru í arbeiðinum við Eysturoyar- og Sandoyartunlinum eru eisini partur av P/F Suðuroyartunlinum. Felagið hevur tó ikki somu royndir við at standa fyri vega- og tunnilsverkætlanum á landi. Tí er ætlanin, at felagið letur partar av uppgávunum til Landsverk, sum varar av landsvegakervinum, og tí hevur drúgvar royndir og holla vitan at standa fyri tunnils- og vegagerð á landi í Føroyum.

Mett verður, at tað tænir samlaðu verkætlanini, at P/F Suðuroyartunnilin ger avtalu við Landsverk um at fyrireika, prosjektera og bjóða út tær verkætlanir, sum eru komnar afturat, síðani forprosjektið hjá P/F Suðuroyartunlinum varð liðugt í 2023, uttan at hetta skakar leiklutabýtið millum P/F Suðuroyartunnilin, sum yvirskipaðan byggiharra, og Landsverk, sum góðkenningar- og eftirlitsmyndugleika. Talan er um avleiddar verkætlanir á Sandoynni.

Higartil hevur eingin serlóggáva verið, sum skipar virksemi hjá felagnum ella ásetir, hvørjar heimildir felagið hevur í mun til Suðuroyartunnilsverkætlanina. P/F Suðuroyartunnilin varð stovnað við 4 mió. kr. í partapeningini, sum varð játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 við tí eina endamáli at gera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy. P/F Suðuroyartunnilin hevði stovnandi aðalfund, tann 8. novembur 2022, har viðtøkur felagsins vórðu samtyktar.

Sambært viðtøkunum er endamál felagsins at gera undirsjóvartunnil millum Sandoy og Suðuroy við tilhoyrandi vegagerð, at hava rakstur av tunlinum um hendi og at reka annað

virksemi í hesum sambandi. Higartil hevur P/F Suðuroyartunnilin einans arbeitt við at fyrireika Suðuroyartunnilin sambært heimildini á fíggjarlógini.

**Til § 2**
Greinin inniheldur reglur um sjálvt partafelagið P/F Suðuroyartunnilin. Reglurnar eru rættuliga einsljóðandi reglunum, sum vóru fyri P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar.

*Stk. 1 og stk. 2.* Her verður staðfest, at partapeningurin skal vera ogn landsins, og at aðrir eigarar, heldur ikki á annan hátt, til dømis við samanlegging v.m., kunnu blíva eigarar av partapeninginum í felagnum. Ásetingin í stk. 2 er hinvegin ikki til hindurs fyri, at felagið kann verða lagt saman við øðrum feløgum, sum landskassin einsamallur eigur.

*Stk. 3.* Eftir greinini skulu starvsskipan, lønir til nevnd og stjóra og lánstreytir góðkennast av landsstýrisfólkinum á økinum.

Á stovnandi aðalfundi, tann 8. novembur 2022, har viðtøkur felagsins vórðu samtyktar, varð nevnd vald og ein stjóri varð settur. Stjórin hevur ábyrgd mótvegis nevnd felagsins fyri dagliga leiðsluni av felagnum.

*Stk. 4*: Landsstýrismaðurin skal taka avgerð í øllum týðandi málum, sum sambært ásetingunum í partafelagslógini skulu leggjast fyri aðalfundi, til dømis val av nevnd, val av grannskoðarar, broyting í viðtøkum felagsins og avgerð um møguligt vinningsbýti.

**Til § 3**
Í § 3 verður heimild latin P/F Suðuroyartunlinum til at gera arbeiðsveg og inntøk til tunnilsmunnar til undirsjóvartunnilin við tí endamáli at gera tað lættari og skjótari at fara í gongd við arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin, um so er, at Løgtingið samtykkir tað við serstakari løgtingslóg.

P/F Suðuroyartunnilin hevur ikki heimild til at fremja inntøk til tunnilsmunnar til ætlaða tunnilin millum Sandvík og Hvalba.

**Til § 4**
Her er ásett, at undirsjóvartunnilin millum Skarvanes og Sandvík við einum tunnilsøki til ein møguligan Skúvoyartunnil, og Sandvíkartunnil, umfarsvegur í Hvalba, farleið frá Sandoyartunlinum í Traðardali til Líðarenda, og vegur frá Líðarenda til Suðuroyartunnilin við íbinding til vegin til Skálavíkar og vegin til Skarvanesar, verða fyrireikað, prosjekterað og boðin út, men heimild er ikki at taka av nøkrum tilboði eftir hesi grein.

Forkanningararbeiðið, sum Løgtingið við játtan á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur samtykt, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi gera, er komið væl ávegis.

Givið er tó, at fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at verkætlanin kann bjóðast út. Harumframt eru eisini verkætlanir tiknar við í samlaðu verkætlanini, sum higartil ikki hava verið partur av arbeiðinum.

Tað, sum er við í forprosjektinum hjá P/F Suðuroyartunlinum, er undirsjóvartunnilin, tunnil millum Sandvík og Hvalba og vegir í Sandvík og Hvalba.

Burtursæð frá sjálvum Suðuroyartunlinum, hevur forprosjektið ikki gjørt endalig tilmæli um linjuføringar fyri vegir og tunlar frá undirsjóvartunlinum til landsvegin sunnanfyri Hvalba.

Myndirnar, sum eru í hesum uppskoti, vísa tí ikki endaligar linjuføringar, sum liggja fast.

Framhaldandi fyrireikingar, myndugleikakrøv o.a. skulu endaliga gera av, hvar linjuføringarnar skulu vera, áðrenn einstaku partarnir av verkætlanini verða prosjekteraðir.

Tá ið verkætlanirnar eru liðugt fyrireikaðar, prosjekteraðar og tilboðini eru innkomin og kostnaðurin fyri tunnilin er kendur, verður við serstakari løgtingslóg endaliga gjørt av, um prosjektið skal fremjast. Samstundis verða útrokningar gjørdar fyri, hvussu nógvan pening neyðugt er at seta av á fíggjarlógini tey komandi árini fyri at alt skal hanga saman fíggjarliga. Eisini verður ásett í lógini, hvørjar peningarupphæddir landskassin skal læna P/F Suðuroyartunlinum.

**§ 4, stk. 1, nr. 1 og 2**
Verandi farleið gjøgnum Sandalíð er ikki nøktandi til ferðsluna sum er nógv vaksin síðani Sandoyartunnilin og skal tí dagførast. Ein møguligur Suðuroyartunnil ger henda tørv enn størri, og farleiðin verðr ein av høvuðsfarleiðunum í landinum við nógvari og tungari ferðslu, og tí er avgjørt at fyrireikingin av dagførdari farleið fyri núverandi farleið gjøgnum Sandalíð skal vera partur av hesi verkætlanini.

Landsverk hevur arbeitt við ymiskum møguligum loysnum viðvíkjandi farleiðini gjøgnum Sandalíð, um ein Suðuroyartunnil verður gjørdur.

Eitt uppskot er, at gera ein stuttan tunnil og longri vegastrekki og annað uppskot er at gera ein longri tunnil og styttri vegastrekki.

Harumframt er ein triði møguleiki at gera ein longri veg, sum kemur at liggja omanfyri verandi farleið.

Talan er tó framvegis um uppskot, og farið verður nú undir at fyrireika, prosjektera og bjóða út farleiðina um Sandalíð.

Av hesum trimum loysnum krevja fyrstu tvær loysnirnar sum ganga gjøgnum Sandalíð eina dagføring av verandi vegi sum gongur ígjøgnum Sands bygd.

Ferðslan gjøgnum Sands bygd fer at økjast, um Suðuroyartunnilin verður gjørdur.

Væntaða ferðslan gjøgnum Suðuroyartunnilin, verður mett til í fyrstuni at vera áleið 1400 bilar um samdøgrið.

Hetta kemur at merkjast, hóast talan ikki er um ovurhonds stóra ferðslu, og krevur átrokandi dagføring av vegnum um Sands bygd.

Harumframt eru tað uml. 10 ár frá tí, at avgerð er tikin um ein undirsjóvartunnil, til tunnilin verður tikin í nýtslu.

Vegurin um Sands bygd er høvuðsvegur bæði til eystan bygdirnar á Sandoynni og til ein undirsjóvartunnil millum Skarvanes og Sandvík og eigur at verða dagførdur.

Tveir møguleikar eru umrøddir.

Ein møguleiki er upprætting av verandi vegi, sum er vestan fyri vatnið, og hin møguleikin er ein nýggjur vegur eystan fyri vatnið, har uppdyrkingarvegur er í dag.

Báðar linjurnar verða bundnar í ávikavist við og norðanfyri skúlan og báðar linjur eru uml. 3,5 km langar og eru leysliga mettar at kosta uml. 70 mió. kr.

Lendið er ikki so avbjóðandi, og til ber at leggja grót frá tunnilsverkætlanini til síðis at brúka til vegagerðina.






Tunnilsvegurin gongur frá tunnilsmunnanum í Djúpadali norður til Sandalíð:




Tvær linjuføringar vórðu kannaðar. Ein niðan í dalin móti Lítlavatni, fyri koyra niðan um vátlendið millum vøtnini, og onnur áleið eftir verandi vegi. Sambært forprosjektinum ger linjuføringin eftir áleið verandi vegi minni inntriv í náttúruna, tá verandi vegur verður fylgdur, og tá hellan niðri við Stóravatn er tætt við yvirflatuna.

Talan verður um ein H1 veg, sum verður lagdur á leið, har gamli vegurin liggur, og so vítt gjørligt í lendið. Longdin verður 3,2 km, og nýggja íbindingin til Skarvanesar verður 1,3 km long.

## § 4, stk. 1, nr 3

Grundarlagið undir arbeiðinum at fyrireika Suðuroyartunnilin hevur verið at finna eina loysn, sum letur seg gjøgnumføra við atliti at trygd, kostnaði og jarðfrøði.

Avbjóðingin er, at ferðslan verður lutfalsliga lítil, og tunnilin verður langur. Hetta hevur í forprosjektinum havt við sær eina loysn við einum tunli við ferðslu báðar vegir í sama bergholi.

Neyðugt hevur tí verið at fáa serfrøðingar at gera váðametingar fyri at tryggja, at trygdin verður í lagi, bæði í byggitíðarskeiðinum og eftir, at tunnilin letur upp fyri ferðslu.

Nýggjastu váðametingarnar eru (fylgiskjøl 4-9):

| | |
|---|---|
| 19.04.2022 | Risiko knyttet til brann ved ulike konsepter for Sudurøytunnelen (Sweco) |
| 06.05.2022 | Brannrisiko under bygging af tunnelser (Sweco) |
| 10.11.2023 | Suðurøytunnelen, Risikovurdering av aspekter knyttet til byggeperioden (Sintef) |
| 24.11.2023 | Risikovurdering, Forprosjekt Suðuroyartunnilin (Norconsult) |
| 15.03.2024 | Risikovurdering av langsgående ventilasjon i Sudurøytunnelen (Sweco) |
| 11.10.2024 | Peer Review and Second Opinion of Risk Analyses for Suðuroyartunnilin (HJO Consulting) |

Tunnilin skal vera tryggur, og tí bað P/F Suðuroyartunnilin um 3. partsmeting frá HOJ Consulting úr Sveits av váðagreiningunum, sum Sweco og Norconsult høvdu gjørt, og hvørji trygdartiltøk eru neyðug. 3. partsmetingin frá HOJ Consulting varð tøk um miðjan oktobur 2024.

Samanumtikið vísir HOJ Consulting á, at undanfarnar frágreiðingar um trygd hava ávísar manglar í mun til góða siðvenju fyri váðastýring.

HOJ Consulting metir tó, at tað ber til at handfara váðar, sum eru við at byggja og reka ætlaða Suðuroyartunnilin,. Tað krevur eina gjølla váðagreining, neyva fyrireiking og meting av fleiri trygdartiltøkum.

P/F Suðuroyartunnilin arbeiðir longu við hesum trygdartiltøkum, sum eyka tiltøk í mun til Sandoyartunnilin:

- Vendipláss fyri hvørjar 1.000 metrar (2.000 metrar í Sandoyartunlinum)
- Fjarstýrdir bummar fyri at steingja inni í tunlinum
- Skelting og ávaringarljós
- Møguleiki fyri at venda ventilatiónini
- Krøv til responstíð hjá sløkkiliðnum
- Møgulig krøv til tunga ferðslu
- Møguleiki fyri 22 trygdarrúmum (105 mió. DKK/165 mió. NOK)

Sambært HOJ Consulting eiga fleiri trygdartiltøk at verða kannað nærri fyri at tryggja, at tey eru nøktandi og kostnaðareffektiv, herundir:

- Hátalaraskipan (PA-skipan) í tunlinum
- Trygdarrúm fyri hvørja 500-1.000 metrar (P/F Suðuroyartunnilin hevur arbeitt við 1.000 metrum)
- Ferðsluavmarkingar fyri tung akfør/hættisligan farm
- Breiðari tunnilsprofil (umhugsa T10,5 í staðin fyri T9,5)
- Betri bjargingartænastu nær undirsjóvartunlinum

Í sambandi við endaligu prosjekteringina og útbjóðingina av tunnilsverkætlanini verður arbeitt víðari við at greina váðar og møgulig trygdartiltøk, herundir eisini kostnaðin av at seta trygdartiltøkini í verk og ávirkan teirra á trygdina.

**Jarðfrøðilig viðurskifti**
Eftir tilmæli frá Jarðfeingi eru gjørdar jarðfrøðisligar forkanningar av økinum, har Suðuroyartunnilin eftir ætlan skal borast.

Í høvuðsheitum hevur talan verið um:

- Skrásetingar á landi
- Kjarnuboringar
- Seismiskar kanningar av havbotninum
- Multibeam kanningar av havbotninum

Í sambandi við leyst tilfar omaná helluni stendur í frágreiðingini "Sediment cover between Sandoy and Suðuroy", Jarðfeingi 18. desembur 2023:

> *"Along the tunnel profile, the sediment cover is generally about 6 m and less. Just north of Skugvoy, there is a sandbank with about 12 m thick sediments, and towards Suðuroy there are a couple of places with 10 m thick sediment cover (Figure 2)."*

Í frágreiðingini "A revised geological description of the Suðuroy tunnel area. A work in progress. Status report ultimo 2021", Jarðfeingi 2022, nr. 03, er eitt yvirlit yvir kjarnuboringar

og tunlar í ymisku jarðfrøðiligu fláunum í Føroyum, samanborið við, í hvørjum fláum Suðuroyartunnilin fer at liggja í:




Seinni eru kjarnuboringar gjørdar norðanfyri Skarvanes (~400m) og í Skúvoy (~1100m). Onkrar smærri kanningar skulu gerast afturat, og ein endalig jarðfrøðilig frágreiðing skal gerast liðug í 2025, sum tekur samanum samlaðu jarðfrøðina.

Sum tað sæst á myndini, verður Suðuroyartunnilin bygdur í stóran mun í miðfláunum (Malinstindur) og ein partur í ovastu fláunum (Enni). Hetta er jarðfrøði, sum góðar royndir eru við at byggja tunlar í. Vágatunnilin, Norðoyatunnilin og partvís Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í miðfláunum. Sandoyartunnilin og partvís Eysturoyartunnilin vóru bygdir í ovastu fláunum.

Higartil er ikki mett, at jarðfrøðin verður truplari, enn hon hevur verið við hinum undirsjóvartunlunum í Føroyum.

Bygging av undirsjóvartunlum eru avbjóðandi verkætlanir, og tí eiga váðarnir at vera avmarkaðir so nógv, sum yvirhøvur til ber, fyri at verkætlanin kann gjøgnumførast við góðum úrsliti, og at trygdin í endaliga tunlinum er í lagi.

Suðuroyartunnilin er ein sera langur undirsjóvartunnil, sum verður longsti tunnil av sínum slagi í heiminum við einum røri og til bilferðslu.

Í byggitíðarskeiðinum verður arbeitt upp til 11.400 m inni í undirgrundini undir sjónum úr hvørjum enda við stytstu tunnilsloysnini.

Tá arbeitt verður undir sjóvarmálanum, kunnu avleiðingarnar gerast umfatandi, og trupult er at koma aftur um aftur, um illa vil til, og tí verður vanliga mælt til at gera undirsjóvar partin so stuttan sum til ber.

Ein arbeiðsbólkur undir Samferðslumálaráðnum viðgjørdi ymiskar møguleikar fyri tunnilsloysnum í 2019 (Fylgiskjal 17), og skrivaði eitt tilmæli út frá atlitum at trygd, fígging og jarðfrøði um Suðuroyartunnilin við tunnilsmunnum við Skarvanes og í Sandvík.

Seinni hevur Sweco gjørt eina váðameting fyri Landsverk í apríl 2022 fyri lidnan tunnil við 4 ymiskum møguleikum fyri linjuføringum:




Tunnelalternativ 1: To etterfølgende tunneler via Skugvøy. Tunnelene blir hhv. 9 km og 17 km lange.

Tunnelalternativ 2: Tunnel passerer under Skugvøy med ventilasjonssjakt eller ventilasjonstunnel til Skugvøy. Tunnelen blir 25,6 km lang.

Tunnelalternativ 3: Korteste alternativ. Passerer nær Skugvøy. Gir mulighet for ventilasjon på Skugvøy. Tunnelen blir 22,2 km lang.

I tillegg er tunnelalternativ 3 vurdert med avgreiningstunnel til Skugvøy fra rundkjøring i hovedtunnelen (tunnelalternativ 4). Tunnelen opp til Skugvøy kan ha tverrsnitt T5,5. Med stigning 1 : 10 vil lengden bli ca. 1500 m.

Niðurstøðurnar í frágreiðingini hjá Sweco um tunnilslinjur vóru:

## 7 Sammenfatning og anbefaling

I dette kapittelet følger en kortfattet oppsummering og anbefaling av de viktigste punktene fra studien.

**Tunnelalternativer:**

- Tunnelalternativene gir ikke store forskjeller i risiko, med unntak av alternativ 1 som har to tunneler og dermed økt sannsynlighet for at brann oppstår. I henhold til beregningene kan en anta omtrent en dobling i frekvens for at en brann oppstår, i forhold til det beste alternativet. Dette skyldes i hovedsak at man har dobbelt antall stigninger, inkludert brattere stigninger på 6% opp til Skugvøy. Konsekvensberegningene viser at selv om man har to kortere tunneler spiller ikke dette nevneverdig positivt inn på resultatene.
- Det anbefales at tunnelalternativ 2, 3 eller 4 bør velges på nåværende tidspunkt, dersom man vurderer ut ifra et sikkerhetsperspektiv. Alternativ 1 bør kun vurderes dersom man ser store økonomiske eller lokale gevinster med å etablere kjøreadkomst til Skugvøy.
- Tunnelalternativ 4 (rundkjøring og bratt veg til Skugvøy) gir ikke redusert risiko i forhold til tunnelalternativ 2. Dersom det brenner i tunnelen og man ventilerer røyk ut tunnelarmen til Skugvøy, hindrer dette muligheten til å evakuere samme vei. Alternativ 4 bidrar dermed ikke til økt sikkerhet ved å ha flere evakueringsmuligheter enn alternativ 2.
- Styring av ventilasjonsanlegget i en brannsituasjon er enklest for alternativ 1 og alternativ 3. Alternativ 2 og 4 krever flere vurderinger da de ulike tunneldelene og sjaktventilasjonen skal styres ulikt avhengig av brannscenariet som oppstår. Dette kan i verste fall medføre ventilasjon av røyk i feil retning under et brannscenario, som kan medføre fatale konsekvenser.
- Tunnelalternativ 4 bør ikke velges hvis sikkerhetstiltak 1, 2 eller 3 benyttes, på grunn av de kompliserte trykkforholdene dette vil medføre i tunnelen.

P/F Suðuroyartunnilin hevur mælt til at arbeitt verður víðari við eini tunnilsloysn við tunnilsmunnum í Djúpadali norðanfyri Skarvanes á Sandoynni og í Sandvík og fevnir forprosjektið um hesa linjuføring. Sí fylgiskjal 1.

P/F Suðuroyartunnilin byggir avgerðina um hesa linjuføring á váðameting frá felagnum Sweco í 2022, og at ein so langur tunnil ikki eigur at vera longri enn hægst neyðugt.

Í sambandi við forprosjektið hevur fyritøkan Norconsult gjørt eina váðameting fyri lidnu loysnina, og fyritøkan Sintef hevur gjørt eina váðameting fyri byggitíðarskeiðið. Harumframt hevur fyritøkan Sweco í mars 2024 gjørt eitt upprit um váðametingina hjá Norconsult. Seinast hevur HOJ Consulting úr Sveits, miðjan oktobur 2024, gjørt eina 3. partsmeting av frágreiðingum hjá Sweco og Norconsult.




Tunnilin verður sambært forprosjektinum 22,8 km langur, 9,5 m breiður og hevur 2 koyribreytir.

Størsta hall er 5% og mesta dýpið er 180 m.

Ein møguligur íbindingartunnil til Skúvoy kann vera 1550 m langur, 8,5 m breiður við halli á 12,5%. Um hallið skal vera minni, verður tunnilin tilsvarandi longri.

Sambært váðametingunum er ein íbinding til Skúvoy ikki ein fortreyt fyri einum Suðuroyartunli.

Fyri at tryggja dygdina av váðametingunum í forprosjektinum, og at neyðug trygdartiltøk verða framd, hevur P/F Suðuroyartunnilin gjørt avtalu við fyritøkuna HOJ Consulting úr Sveits um at gera eina 3. partsmeting, sí omanfyri.

Økini í báðum endum eru í útgangsstøðinum væl egnað til byggipláss, grótgoymslur o.t. burturi frá húsum og tætt við streymasjógv.

**§ 4, stk. 1, nr. 4-6**
Verandi tunnil til Sandvíkar og tilhoyrandi vegir eru ikki tíðarhóskandi og egnaðir til eina høvuðsfarleið. Nýggj vegaføring má gerast frá tunnilsmunnanum til undirsjóvartunnilin í Sandvík og til landsvegin sunnanfyri Hvalba. Vegaføringin fevnir um vegagerð í Sandvík, tunnil millum Sandvík og Hvalba og veg rundanum Hvalba. Samlaði kostnaðurin av vegaføringini er mettur til 400 mió. kr.

Sandvíkartunnilin verður lagdur tvørtur gjøgnum Skálafjall. Sunnari tunnilsmunnin fer at liggja vestanfyri bygdina og verður bundin saman við ætlaða umfarsvegin í Hvalba.




Tunnilin millum Sandvík og Hvalba verður sambært forprosjektinum ein T9,5, eins og Hvalbiartunnilin, Sandoyartunnilin og ætlaði Suðuroyartunnilin.

Vegaføringin í Sandvík er stýrd av tunnilsmunnunum til Suðuroyartunnilin og Sandvíkartunnilin, sum verða bundnir saman av vegnum. Ein íbinding skal gerast til Sandvíkar. Talan verður um ein H1 veg.




Dømi um staðseting av tunnilsmunnum, vegaføringin og av gróti í Sandvík:



Vegurin í Hvalba er við í forprosjektinum og fer eftir ætlan at liggja rundanum verandi vegir í Hvalba. Ætlanin er at gera ein H1 veg við 80 km hámarksferð:




**Til § 5**

Fyri at tryggja ferðslufakligu dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervi annars, kann arbeiðið ikki byrja fyrr enn Landsverk hevur góðkent prosjektið. Tryggjast skal m.a., at teir normar og standardir, sum eru galdandi á økinum, tá henda lóg er samtykt í løgtinginum, verða hildnir.

Landsverk skal eftir hvørt stig í prosjekteringunum hava tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til viðmerkingar og skal harafturat vegna landsstýrisfólkið góðkenna endaligu prosjektini.

Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar sambært samsvarandi góðkendu prosjektum.

**Til § 6**

Stk. 1. Tá ið tilhoyrandi vegir og tunlar uttanfyri sjálvan undirsjóvartunnilin eru lidnir, verða teir avhendaðir landinum fyri útveganarkostnað, og gerast partur av vanliga landsvegakervinum, og fyri teir tunlarnar og vegirnar, verður løgtingslógin um landsvegir beinleiðis galdandi frá tá av. Í byggitíðini letur landið P/F Suðuroyartunlinum lán til verkætlanina, og tá partafelagið avhendar vegir og tunlar til landið fyri upphædd, sum svarar til útveganarkostnað, verður lánitørvurin tilsvarandi minni.

*Stk. 2.* Meðan byggiarbeiðið fer fram, verða umframt rentuútreiðslur eisini aðrar munandi útreiðslur, so sum forkanningar v.m., sum ikki kunnu dragast frá, tí tað verða ongar

rakstrarinntøkur í byggitíðini. Eftir galdandi skattalóg er heimild til at draga frá skattligt hall í skattligu inntøkuni tey fylgjandi 5 árini.

Í hesum skeiði kann frádrátturin tó bert flytast til eitt seinni inntøkuár, rúmast tað ikki í skattskyldugu inntøkuni undanfarna ár. Fyri at eingin ivi skal vera um, hvussu ein vega- og tunnilsgerð í avskrivingarligum høpi er at meta eftir galdandi skattalóg, verður skotið upp, at reglurnar um vinnuligar bygningar verða nýttar, soleiðis sum tað eisini varð gjørt í sambandi við P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Mest nærliggjandi er at sammeta tunnilin við vinnuligan bygning, og tí er hetta skilað til í lógini.

**Til § 7**
Leisturin er hin sami fyri Suðuroyartunnilin, sum fyri hinar undirsjóvartunlarnar í landinum.

Tunnilin er ogn hjá partafelagnum, og partafelagið rekur og viðlíkaheldur tunnilin. Felagið hevur rætt til at krevja gjald fyri at koyra í gjøgnum tunnilin, og tað er felagið, sum ásetur, hvat gjaldið skal verða fyri at koyra í gjøgnum tunnilin.

Tunnilin er ikki ein partur av vanliga landsvegakervinum, men regluverkið kring tunnilin er tað sama fyri Suðuroyartunnilin, sum fyri landsvegir annars, tó so at heimildirnar eru hjá partafelagnum og ikki hjá Landsverki, uttan í teimum førum, har lógin greitt sigur, at Landsverk hevur heimildirnar.

Mett verður, at ferðslan í Suðuroyartunlinum í fyrstuni verður 1.400 akfør tilsamans um samdøgrið (báðar vegir). Til samanberingar kann vísast á, at gerandisferðslan í august 2024, sambært ferðsluteljingum hjá LV á hesum vegastrekkjum, vóru:

| | |
|---|---|
| Hovstunnilin: | 1.648 |
| Vestmannavegurin: | 1.390 |
| Skálavegurin: | 1.383 |
| Norðanfyri Kollafjørð: | 2.878 |
| Glyvravegur: | 7.395 |

Eisini kann vísast á, at í tíðarskeiðinum februar – juni 2024 koyrdu um 900 akfør í miðal um samdøgrið í Sandoyartunlinum (báðar vegir) og í tíðarskeiðinum juli – septembur góð 1.100 akfør í miðal um samdøgrið.

**Til § 8**
Eins og gjørt varð, tá ið Vágatunnilin, Norðoyatunnilin, Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin vórðu gjørdir, so er í lógargrundarlagnum undir tunnilsbyggingini løgd ein heimild til landsstýrið at ognartaka neyðugt lendi, sum verður brúkt í sambandi við tunnilsgerðina. Eisini er heimild til at avhenda tað ognartikna til P/F Suðuroyartunnilin.

Til sjálva tunnilsgerðina er ognartøku ikki fyri neyðini. Men til sjálvar munnarnar og vegirnar til munnarnar er tørvur á ognartøkumøguleika, um semja ikki fæst við ánarnar um at avhenda lendið. Tá ið tað snýr seg um Suðuroyartunnlinum er ognartøkuheimildin meira viðkomandi, tí at prosjektið eisini fevnir um vegir og tunlar, ið eru knýttar at, og tí fevnir um fleiri ognir, sum eru á privatum hondum.

Ognartøkuheimildin fevnir eisini um at ognartaka lendi til ymisk arbeiðsøki, sum tørvur er á uttanfyri tunnilin, og eisini til økið, sum skulu nýtast til at tyrva tunnilsgrótið á.

**Til § 9.**
Staðfestur gildiskomuna.

Løgmansskrivstovan, xx. desembur 2024.

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Tilmæli frá P/F Suðuroyartunlinum viðv. linjuføring, 08.10.2024
Fylgiskjal 2: Forprosjekt Suðuroyartunnilin, Norconsult, 12.05.2023
Fylgiskjal 3: Forprosjekt Suðuroyarleiðin - vegagerð, LBF, 24.11.2023
Fylgiskjal 4: Risiko knyttet til brann ved ulike konsepter for Suðurøtunnelen, Rapport frá SWECO, 19.04.2022
Fylgiskjal 5: Brannrisiko under bygging af tunneler, SWECO, 06.05.2022
Fylgiskjal 6: Risikovurdering av aspekter knyttet til byggeperioden, Notat frá SINTEF, 10.11.2023
Fylgiskjal 7: Risikovurdering, Forprosjekt Suðuroyartunnilin, Norconsult, 24.11.2023
Fylgiskjal 8: Risikovurdering av langsgående ventilasjon i Sudurøtunnelen, SWECO, 15.03.2024
Fylgiskjal 9: Peer Review and Second Opinion of Risk Analyses for Suðuroyartunnlin, HOJ Consulting GmbH, 11.10.2024
Fylgiskjal 10: Evakueringsrom - Utforming og kostnader, Notat fra Norconsult, 21.05.2024
Fylgiskjal 11: Fíggingarleistur, Løgmansskrivstovan, oktobur 2024
Fylgiskjal 12: Fyrivarni Landsbankans til samanbering av kostnaði av suðuroyarsigling og suðuroyartunli, oktobur 2024
Fylgiskjal 13: Kost-nyttu greining, Landsverk, oktobur 2024
Fylgiskjal 14: Mynd við uppskoti til staðseting av gróti í Djúpadali
Fylgiskjal 15: Mynd við uppskoti til staðseting av gróti í Sandvík
Fylgiskjal 16: Forkanning av einari nýggjari suðuroyarleið, Landsverk 2021
Fylgiskjal 17: Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil, Samferðslumálaráðið 2019
Fylgiskjal 18: Viðmerkingar til kostnaðarmeting av Suðuroyartunlinum, Landsverk 04.07.2024